| | Blað nr.: 1 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. januar 2026 | Forkvinnunnar merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 29. januar 2026 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Birgir Nielsen
Elin Heðinsdóttir Joensen
Lilja Haraldson Blaasvær

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Fríður P. Dalsgarð
Hermann Mortensen
David Andreasen

**LUTTÓKU IKKI:**
Heðin Mortensen
Guttormur í Skála

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Birita í Dali og Øssur Patursson

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. januar 2026 | Blað nr.: 2<br>Forkvinnunnar merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 1/26 | 26/00830-1 | Heðin Mortensen berst frá at møta á býaráðfundi 29. januar 2026 | 4 |
| 2/26 | 26/00854-1 | Guttormur í Skála : Berst frá at møta á býráðsfundi 29. januar 2026 | 5 |
| 3/26 | 26/00448-1 | Mál beind í nevndir 2026 | 6 |
| 4/26 | 25/01675-1 | Viðgerð av umsóknum um játtan til útiøkini hjá skúlum 2022 til 2025 | 7 |
| 5/26 | 25/05909-18 | Verkætlan í spæliplássinum Amerika - 24/08171 | 18 |
| 6/26 | 25/10738-1 | Niðurleggja skúlan í Norðradali | 21 |
| 7/26 | 25/09196-4 | Gøtunavn til nýggja síðugøtu á Svalbardsvegnum | 23 |
| 8/26 | 25/09234-3 | Gøtunavn til síðuveg á Havnarvegnum (vinnustykki á Ovara Hjalla) | 25 |
| 9/26 | 25/09566-2 | Nýtt gøtunavn til gøtuna til "við Tjarnir" | 27 |
| 10/26 | 25/01098-6 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes - 22/04933 | 30 |
| 11/26 | 25/01104-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað | 35 |
| 12/26 | 25/08430-5 | Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 7, matr. nr. 1314 - Grannalág | 42 |
| 13/26 | 25/08554-7 | Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1233a, 1233b, 1378 og 1235a, Tórshavn | 45 |
| 14/26 | 25/05584-11 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1038k, 1038i, 1038h, 1038g, 1038f og 1038e, Eystan Heyg. Frá sethúsabygging til íbúðarbygging | 48 |
| 15/26 | 25/10630-1 | Nýggjur umráðispartur í almennu byggisamtyktini. A4 – opin og lág bústaðabygging | 52 |
| 16/26 | 25/10812-1 | Ferðslumodel | 54 |
| 17/26 | 25/11095-1 | Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak | 56 |
| 18/26 | 25/10815-1 | Bussskýli í kommununi | 58 |
| 19/26 | 25/10356-1 | Samstarvsavtala millum Barnaverndartænastuna í Tórshavnar kommunu og Barnaverndartænastuna í Sandoyar og Skúvoyar kommunur | 61 |
| 20/26 | 26/00184-1 | Hvítanes og Sund sum valstað í Hoyvík | 64 |
| 21/26 | 25/00161-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025 | 67 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 22/26 | 25/06711-5 | Umsókn um loyvi at at seta heitar pottar uttan fyri Sjósavnið, til økið verður eitt byggipláss í 2027 | 71 |
| 23/26 | 25/08410-6 | Umsókn um planering og byggiloyvi til at seta bingjur | 73 |
| 24/26 | 25/08434-2 | Umsókn um stuðul til at klæða húsini, Strúkijarnið, matr. nr. 170, Bakkahella 2, Tórshavn | 76 |
| 25/26 | 25/09911-7 | Umsókn um stuðul til umvæling av matr. nr. 142c, Reyngøta 16, 100 Tórshavn | 80 |

**Til viðgerðar**

## 1/26 Heðin Mortensen berst frá at møta á býaráðfundi 29. januar 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 1/26 | 26/00830-1 |

**Málslýsing:**
Heðin Mortensen hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Elin Heðinsdóttir Joensen, eru loknar.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Samtykt.

## 2/26 Guttormur í Skála : Berst frá at møta á býráðsfundi 29. januar 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 2/26 | 26/00854-1 |

**Málslýsing:**
Guttormur í Skála hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Lilja Blaasvær, eru loknar.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>29. januar 2026 | Blað nr.: 6<br>Forkvinnunnar merki: |

# 3/26 Mál beind í nevndir 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 3/26 | 26/00448-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Tikið til eftirtektar.

# 4/26 Viðgerð av umsóknum um játtan til útiøkini hjá skúlum 2022 til 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 16.01.2025 | 6/25 | 25/01675-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 05.06.2025 | 37/25 | 25/01675-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 149/25 | 25/01675-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 27.11.2025 | 77/25 | 25/01675-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 219/25 | 25/01675-1 |
| 6 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 270/25 | 25/01675-1 |
| 7 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 4/26 | 25/01675-1 |

**Upprunin til málið**
Umsóknir verða viðgjørdar og lagdar fyri Trivnaðarnevndina til avgerðar á hvørjum árið tá fíggjarætlanin er samtykt og játtan avsett til útiøkini hjá skúlum.

**Lýsing av málinum**
Í 2024 er kr. 1 mió játtað til úttøkini hjá skúlum, og játtanin er býtt soleiðis:

| | |
|---|---|
| Skúlin á Fløtum – fallundirlag | 130.000 |
| Skúlin á Fløtum – Guliskúli | 30.000 |
| Skúlin á Argjahamri | 400.000 |
| Sankta Frans skúli | 290.000 |
| Velbastaðar skúli | 150.000 |

**Umsóknir um játtan í 2025**
Fimm umsóknir eru um játtan til útiøkini. Umsóknirnar eru hjálagdar.

<u>Sankta Frans skúli</u>
Søkt verður um játtan til skúlagarðarnar. Umframt Amerika eru tríggir skúlagarðar, og skúlin søkir um upphædd svarandi til 100 tkr. til hvønn garð, sostatt verður søkt um 300 tkr.

Í umsókníni stendur m.a., at miðdeildin hevur júst valt næmingaráð, og tey hava ikki skipað seg enn, men ætlanin er, at næmingaráðið ger eina kanning, so næmingarnir fáa høvi at siga sína hugsan um skúlagarðarnar, og hvør tørvurin er. Skúlin fer saman við næmingaráðnum at gera eina ætlan at gera skúlagarðarnar áhugaverdar. Ætlanin er at skapa eitt spennandi og mennandi umhvørvi hjá næmingunum at ferðast í í fríkorterunum.

Lítligarður er garðurin hjá 1. og 2. flokki, og har er hugsanin at umvæla vøllin og asfalti og fáa ein klatrivegg á baksíðuna á fótbóltsvøllinum og góðkent undirlag framvið klatrivegginum.

Stórigarður er garðurin til 3. flokk og miðdeildina. Garðurin er eisini “parkeringspláss” hjá foreldrum sum fara í forskúlan við børnunum um morgunin. Asfaltið er slitið og tørvar umvæling, og málini eru illa farin, kanska tey kunnu umvælast um ikki, so mugu tey skiftast út. Økið millum báðar skúlarnar og við inngongdina í Willumsgøtu, er upplagt øki til annað enn bóltspæl. Tað er serliga har skúlin hugsar, at næmingaráðið skal siga sína hugsan um, hvat skal vera har.

Norðurgarður er garðurin hjá forskúlanum og 3. flokki. ætlanin er, at bóltvøllurin skal fáa undirlag, og at undirlag verður lagt við stóru steinarnar í garðinum, haraftrat er tørvur á útgerð til yngru næmingarnar t.d. smáar trampolinir og klatriveggur.

Skúlin við Løgmannabreyt
Skúlin fer at seta rennistrong upp og søkir um játtan at seta upp og at leingja Forðabreytina. Søkt verður um 300 tkr. til forðabreyt og uppseting.

Eysturskúlin
Skúlin hevur nú í nøkur ár útbygt útiøkið við játtan av upphæddini til útiøkir hjá skúlum, og søkir um 746.236,- kr til eitt punktstorn og eitt tresfit/parkur. Við í kostnaðarmetingini er eisini undirlag og uppseting.

Í umsóknini stendur um punktstornið, at tað er ætlað innskúling og miðdeild og skal setast upp í garðinum mótið Djóna í Geil gøtu. Spæliøkið í grøna økinum oman fyri Alonina verður nógv brúkt, og er ov lítið til øll børnini, so punktstornið fer at lætta um trýstið, sum er í spæliøkinum við A-lonina. Punktstornið er gott fyri grovmotorikkin hjá børnum, og tað er umráðandi at hava góðar møguleikar at mennast grovmotoriskt, tí gransking vísir,at grovmotorikkurin hevur stóran týdning fyri innlæringina hjá børnum.

Tresfit/parkur hevur sama týdning sum tornið, men er serliga ætlað næminginum í miðdeild og hádeild, Henda útgerð fer at lætta um hølisavbjóðingarnar í ítrótti. 15 næmingar kunnu gera venjingar á stativunum í senn. Nám X hevur tvær stórar breytir, har høvuðsinnihaldið er kropslig rørsla/avbjóðing. Í umsóknini stendur m.a.:"Eisini er hetta ein góður máti at flyta undirvísingina út og eggja næmingum til at venja og verða kropsliga virkin." Útgerðin kann verða brúkt í undirvísing, í fríkorterum og eftir skúlatíð. Spæliøkið í Eysturskúlanum verður nógv brúkt í frítíðini.

Kollafjarðar skúli
Skúlin søkir um 279.858,- kr. til skreiðubana, klintrivegg, klintrinet, stólpar og tog at ganga á. Ætlanin er at seta leikurnar upp í økinum millum skúlan og svimjihøllina.

Í umsóknini stendur m.a.:"Tað, sum vit hugsað, er at seta útileikur í eitt øki, har einki er, men har børnini eisini hava góðar umstøður at spæla. Málbólkurin hesaferð eru teir yngstu næmingarnir. Serliga hugsað vit um innskúlingina og forskúlan, sum skal byrja hjá okkum komandi skúlaár.

Av tí, at staðsetingin liggur ímillum skúlan og svimji- og ítróttarhøllina, vænta vit eisini, at tey verða mong, sum fara at fáa gleði av hesum útileikum, tá tey eru í økinum í øðrum ørindum, enn í skúla."

Skúlin á Argjahamri
Í sambandi við játtan á 400 tkr. í 2024 hevur býarskipanardeildin hjálpt við at gera eina heildarætlan og kostnaðarmeting fyri menning av útiøkinum. Kostnaðarmetingini fyri 3 øki er 4.493.950,- kr.

Øki 1. Multifótbóltsvøllur og parkour økið, øki 2 uppihaldstaður við kurvabóltvølli, bonkum og bálplássi og øki 3 náttúrulendi, sum bleiv lagt undir mold í sambandi við útbygging, ynski er um at fáa upprunaliga lendið fram aftur.

Um øki 1 skrivar skúlin i umsóknin m.a.," Nú Barnagarðurin á Hamrinum verður útbygdur, hevur kommunan valt at matrikkulera Fifa vøllin, sum skúlin hevur brúkt hvørt tað einasta fríkorter til barnagarðin. Hetta er ein stórur missur hjá teimum 150 næmingunum í miðdeild, sum hava brúkt vøllin dagliga síðan 2011. Vit meta eisini, at tað tíverri er eitt neiligt signal at senda út til næmingarnar hjá okkum, tá nú næmingaráðið í miðdeild hevur kempa fyri at fáa hegn runt um vøllin." Skúlin heitir á kommununa at gera eina íløgu í nýggjan vøll niðanfyri skúlan við Tváttá.

Kostnaðarmetingin er 3.5 mió. kr. Víst verður til mál 24/08100 og samtykt í trivnaðarnevndini 31. oktober 2024 at finna fígging á fíggjarætlanini 2025. Harumframt er ætlan um parkour økið á lítla grøna slættanum niðanfyri skúlan, men kostnaðarmeting fyri tann partin fyriliggur ikki enn.

Viðvíkjandi øki 2 arbeiðir skúlin saman við býarskipanardeildini og umboði fyri mentamáladeildina at gera økið vestanfyri skúlan brúkiligt. Arbeiðið er byrjað at gera ein kurvabóltsvøll uttanfyri høllina og at gera uppihaldsøki, bálstað og øki til smáar felagsveltur í grøna skráanum niðanfyri. Kostnaðarmetingin fyri økið 2 er góðar 300 tkr.

Øki 3 - í sambandi við útbyggingina av Høllini á Argjahamri varð hetta økið tyrvt undir í eyri, gróti og mold. Hetta var upprunaliga eitt náttúru vakurt stað við vøkrum og serstøkum hagagróti, og ynski er at fáa vakra hagagrótið undan kavi aftur, so náttúran kemur aftur til sín rætt. Leyslig kostnaðarmeting at beina tilfarið burtur er 400 tkr.

Skúlin á Fløtum
Játtan á 130 tkr til at gera ábøtur á fallundirlag verður nýtt til endamálið. Byrja er við, at Hjálpirót hevur gjørt eina roynd at smyrja eyka lím á skaðar á fallundirlagnum, mett verður um, hvussu hetta riggar, áðrenn farið verður víðari. Nógvir skaðar eru á fallundirløgunum á spæliplássunum kring skúlan, so tørvur verður á framhaldandi ábótum og møguliga á útskiftan av fallundirlag.

Skúlin á Fløtum hevur ikki sent inn umsókn í ár, tí roknað verður við, at aðrir skúlar hava størri tørv. Skúlin hevur tó eina stigvísa heildarætlan fyri planting og kostnaðarmeting liggjandi fyri útiøkið, sum kann setast í verk um játtan er tøk til endamálið. Skjal nr. 21/04532-41

**Umsóknir i 2025 – upphæddir**
Upphædd u/mvg

| | |
|---|---|
| Sankta Frans skúli | 300.000 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 300.000 |
| Eysturskúlin | 746.236 |
| Kollafjarðar skúli | 279.858 |
| Skúlin á Argjahamri ? | |
| **Tilsamans (- SáAH)** | **1.626.094** |

**Uppskot um býti av játtan í 2025**
Upphædd við 6,25% mvg

| | |
|---|---|
| Kollafjarðar skúli | 300.000 |
| Sankta Frans skúli | 212.000 |
| Eysturskúlin | 185.000 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 160.000 |
| Endurnýggjan/viðlikahald | 143.000 |
| **Tilsamans** | **1.000.000** |

Uppskotið um býti av játtan var á skrá til fundin við skúlastjórar, sum var hósdagin 7. november 2024.

Skúlastjórarnir høvdu sum so ikki viðmerkingar til sjálvt býti av játtan, men ein gjørdi vart við, at gott hevði verið um, hvør skúli hevði eina játtan á uml. 50 tkr. sum var til viðlíkahald ella endurnýggjan av t.d. benkum og borðum, at mála spøl í garðin og smærri viðlíkahald. Haraftrat varð víst á, at nú byrja fallundirløg at slítast, og tey kosta nógv, so játtanin til endurnýggjan viðlíkahald kundi verið hægri.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2025 er 1.000.000,- kr. settar av á 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til útiøkini hjá skúlum. Uppskot og tilmæli eru við tí fyrivarni, at 1.000.000,- kr. verða játtaðar á 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til útiøkini hjá skúlum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Loka mál fyri undanfarnu býráðssetu: 21/04532

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

| | | |
|---|---|---|
| PDF | Umsókn um játtan til útiøki við Kollafjarðar skúla.msg | 22.11.2024 |
| PDF | Umsókn spæliøkið Eysturskúlin .msg | 22.11.2024 |
| PDF | Umsókn til útiøki.msg | 22.11.2024 |
| PDF | Umsókn vv útiøki Skúlin á Argjahamri.docx | 30.10.2024 |
| PDF | Umsókn til útiøki 2024.pdf | 17.10.2024 |
| PDF | umsókn spæliøkið Eysturskúlin 2024.pdf | 11.10.2024 |
| PDF | 0558_001.pdf | 11.10.2024 |
| PDF | Spælipláss í Kollafirði.pdf | 17.10.2024 |
| PDF | image.png | 05.11.2024 |
| PDF | image.png | 05.11.2024 |
| PDF | image.png | 05.11.2024 |
| PDF | image.png | 05.11.2024 |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 4175 | | Dagføring av skúlum |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 4175 | LK 41019 | Skúlar, uttanumøki | |

| **Upphædd** |
|---|
| 2.000 tkr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at játta 1.000.000,- kr. av 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til útiøkini í 2025, og at játtanin verður býtt sambært uppskotinum omanfyri.

**Trivnaðarnevndin 28. november 2024:** Útsett.

**Ískoyti:**
Nú fíggjarætlanin fyri 2025 er samtykt, er greitt, at 2 mió kr. eru settar av á 4175 Dagføring av skúlum til útiøkini hjá skúlum. Umsitingin hevur tí dagført uppskotið um býti av játtan. Uppskotið var á skrá til fundin við skúlastjórar, sum var hósdagin 5. desember. Skúlastjórarnir høvdu ongar viðmerkingar til uppskotið.

**Dagført uppskot um býti av játtan í 2025**
Upphædd við 6,25% mvg

| | |
|---|---:|
| Kollafjarðar skúli | 300.000 |
| Sankta Frans skúli | 212.000 |
| Eysturskúlin | 609.000 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 160.000 |
| Skúlin á Argjahamri | 519.000 |
| Endurnýggjan/viðlíkahald | 200.000 |
| Tilsamans | 2.000.000 |

Broytingarnar í dagførda uppskotinum eru, at játtanin til Eysturskúlan og játtanin til endurnýggjan/viðlíkahald eru hækkaðar, og at játtan er til Skúlan á Argjahamri.

<u>Eysturskúlin</u>
Eysturskúlin søkti um játtan til punktstorn, ið er ætlað grunddeild og miðdeild og skal setast upp í garðinum móti Djóna í Geil gøtu. Haraftrat søkti skúlin um tresfit/parkur til mið- og hádeild, kostnaðarmetingin fyri tað er 185 tkr. kostnaðarmetingin fyirð punktstornið er 609 tkr. upphæddirnar eru við 6,25% mvg. nú játtanin til útiøkini er hækkað verður mælt til at játta 609 tkr. til punktstorn til útiøkið hjá Eysturskúlanum.

<u>Skúlin á Argjahamri</u>
Í fíggjarætlanini fyri 2025 er játtan ikki sett av til multivøll til Skúlan á Argjahamri, tí verður mælt til at játta 519 tkr. til lítlan sparkivøll í Skúlan á Argjahamri, sum eftir ætlan verður staðsettur omanfyri skúlan. Hesin vøllur verður so til børnini í grunddeild og frítíðarskúla. Hóast upphæddin ikki er nóg høg til liðugt gerð av einum sparkivølli, er hon væntandi nóg mikið til at gera lendisarbeiðið, asfalt og seta girðing um vøllin. Sparkivøllur við grúsi/asfalti og girðing kann takast í nýtslu, og so ber til seinni at taka støðu til, hvat undirlag skal vera á vøllinum, og møguliga finna fígging til undirlag og álegging í 2026.

Plássið omanfyri skúlan er ikki stórt, og fyrispurningur er sendur Býarskipanardeildini um avbjóðingar eru við plassi til lítlan sparkivøll og matrikumarkið millum skúlan og útstykkingina omanfyri.

<u>Endurnýggjan/viðlíkahald</u>

Sum víst varð á á fundinum við skúlastjórar hósdagin 7. november 2024, eru fallundirløg við at slítast. Haraftrat eru neyðugur ábøtur á undirlag í Skúlanum á Fløtum. Mett verður neyðugt at hava eina hægri játtan til endurnýggjan og viðlíkahald, tí er upphæddin í dagførda uppskotinum hækkað til 200 tkr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at játta 2.000.000,- kr. av 4175 dagføring av skúlum, og at játtanin verður býtt sambært uppskotinum omanfyri

**Eyka trivnaðarfundur 17. December 2024:** Avlýstur

**Ískoyti:**
Trivnaðarstjórin hevur umvegis teldupostsamskifti j.nr.21/04532-60 til 64 lagt málið fyri nevndarlimirnar og hevur nevndin tikið undir við málinum. Svarskriv eru síðani send umsøkjarunum fyri ársskifti.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at staðfesta avgerðina hjá undanfarnu Trivnaðarnevnd

**Trivnaðarnevndin 16. januar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:** Tørvur er á at gera umraðfestingar av játtanum til útiøkini hjá Sankta Frans skúla og Skúlanum á Argjahamri.

Útiøkið hjá Sankta Frans skúla:

Í 2025 er játta 212 tkr. av staðnummar 4175 til útiøkir í skúlagarðinum.
Í 2024 er játta 290 tkr. av staðnummar 4140 til spæliplássi Amerika (Ikki til avvatning)
Í 2023 er játta 83 tkr av staðnummar 4140 til spæliplássi Amerika (avvatning)
Íalt er játta 585 tkr. og einki er brúkt enn.

Størsta ynski hjá skúlanum er at fáa gjørt nakað við Amerika, tí har eru teir mest spennandi spælimøguleikarnir.

Skúlaleiðslan hevur saman við umboðum frá mentamáladeildini, bygningdeildini og býarskipanardeildini verið á staðnum og umrøtt møguleikarnar. Stóra avbjóðingin er avvatning á spæliøkinum og av vátlendinum omanfyri spæliøkið. Fyrr enn hesin trupulleikin er loystur er ikki ráðiligt at gera stórvegis við undirlagið við útileikurnar á spæliplássinum. Á spæliplássinum er dren lagt oman ígjøgnum lendi og frárensl, men har skal drenast vøl betur og leggjast náttúru undirlag undir leikur har mest slit er. Býarskipanardeildin umhugsar eina loysn har demma verður við einum garði millum spæliplássi og vátlendi, har grava og steinsett verður fyri einum hyli í vátlendinum og lendi hampa rundanum, so vátlendi eisini verður eitt hugnaligt umhvørvið. Avtala var at arbeiða fram ímóti eini felags verkætlan fyri avvatning.




Mentamáldeildin mælir til at játtanin frá 2024 á 290 tkr. verður umraðfest, so 370 tkr er til avatning av spæliplássinum Amerika til eina felags verkætlan fyri avvatning í økinum.

Mentamáldeildin trýstir á býarskipanardeildina um teirra møgulleika og vilja at raðfesta fígging til avvatning av vátlendinum.

Útiøkið hjá Skúlanum á Argjahamri:
Í 2025 er játta 519 tkr. av 4175 til sparkivøll til grunddeildina/frítíðarskúlan
Í 2024 er játta 400 tkr. av 4140 til kurvabóltsvøll og uppihaldsstað
Samlaða játtanin er soleiðis  919 tkr.

Av játtanini  á 400 tkr. er brúkt 53 tkr. og avtala er við bygningsdeildina um at bjóða lendisarbeiðið út fyri báðar verkætlanirnar.

Bygningdeildin metir at lendisarbeiðið verður kostnaðamiklari enn mett í kostnaðarætlanunum sum liggja til grund fyri játtanunum. Skúlaleiðslan boðar tí frá, at tørvurin á at útbyggja skutaraskúrin fyri 200 tkr (játtan frá trivnaðarnevndini av 4140 j.nr. 24/01464) ikki er so stórur sum undanfarin ár og at tað er

týdningarmiklari fyri trivnaðin hjá næmingunum at raðfesta útiøkið, tvs sparkivøll, basketvøll og upihaldstað.

Mentamáladeildin mælir tí til at broyta samtyktina um játtan á 200 tkr. til skutara skúr og raðfesta játtanina til úti økið hjá Skúlanum á Argjahamri.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 4140 | 41534 Spælipláss Amerika (ikki avvatning) | Ætlanir á skúlaøkinum | 4140 | 41534 Spælipláss Amerika (avvatning) | Ætlanir á skúlaøkinum | | 290 tkr. |
| 4140 | Útbygging av skutaraskúri | Ætlanir á skúlaøkinum | 4140 | 41533 Skúlin á Argjahamri (útiøkið) | Ætlanir á skúlaøkinum | | 200 tkr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á Mentamáladeildini mæla til at:

- at játtanin frá 2024 til útiøkið hjá Sankta Frans á 290 tkr. verða umraðfestar, so 373 tkr. (játtan frá 2023 og 2024, sí undir ískoyti) er til avvatning av spæliplássinum Amerika til eina felags verkætlan fyri avvatning í økinum, og

  at broyta samtyktina í mál 24/01464 um 200 tkr, til útbygging av skutaraskúri, til at játta tær 200 tkr. afturat til úti økið hjá Skúlanum á Argjahamri.

**Trivnaðarnevndin 05. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tørvur er á at staðfesta samtyktina hjá trivnaðarnevndini 16. januar 2025,har býti av íløgujáttnini á 2 mio kr í 2025 til útiøkir hjá skúlum var deilt út til verkætlanir á fylgjandi skúlum:

| | |
|---|---|
| Kollafjarðar skúli | 300.000 |
| Sankta Frans skúli | 212.000 |
| Eysturskúlin | 609.000 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 160.000 |
| Skúlin á Argjahamri | 519.000 |
| Endurnýggjan/viðlíkahald | 200.000 |
| Tilsamans | 2.000.000 |

Íløgujáttanin hevur áður verið rakstrajáttan á 4140 Ætlanir á skúlaøkinum við 1 mío. kr. árliga, men er í 2025 flutt á íløgukontu 4175 og hækkað til 2 mó kr.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læuttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 4175 | | Dagføring av skúlum | 4175 | LK 41019 | Skúlar, uttanumøki | | 2.000 tkr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðaræetlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á Mentamáladeildini mæla til at samtykkja íløgubýti og at leysgeva 2 mió kr. av konto 4175 á nýggja prosjekt konto undir § 4 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin í telduposti 16. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum.

Málið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

**Ískoyti:**
Trivnaðarnevndin hevur, í samtykt omanfyri, tann 5. juni 2025 ,umraðfest játtan frá 2024, soleiðis at 370 tkr. er avsett  av konto 4140 til avvatning av spæliplássinum Amerkia hjá Sankta Frans skúla. Mentamáladeildin hevur samskift við leiðsluna í Sankta Frans skúla, sum tekur undir við, at ein játtan til skúlagarðin á 212 tkr. av íløggujáttanini fyri 2025, sum bygningsdeildin umsitur, heldur verður nýtt til Amerika. Bygningsdeildin tekur undir við hesum, um trivnaðarnevndin góðtekur umraðfestingina.

Býarskipanardeildin hevur síðani raðfest 500 tkr. av rakstrinum í 2025 til avatning av mýrulendinum omanfyri spælipléssi, við eini lítlari tjørn og uppihaldsstað.

Í alt er sostatt útvega 1.082 tkr til endamálið

Býarskipanaradeildin hevur fíggja ger av eini ætlan fyri samlaða økið Amerika, j.nr. 25/01675-12, sum eftir útbjóðing, vísir seg at krevja eina íløgu á 2.3 mió. kr.

Verkætlanin snýr seg í høvuðsheitum um fylgjandi

- avvatning  av økinum upp í Amerika,
- nýtt náttúrufallundirlag verður gjørt og aðrar smærri tillagingar verða gjørdar á spæliplássinum
- Gøtan oman gjøgnum økið, inn i viðarlundina verður hække og ein tjørn við við uppihaldsstað og gøtu rundanum verður gjørd í núverandi mýrulendinum.
- Einstøk trøð og innrássnir runnar verða burturbeindir.
- Mold og eyrur ið verður grivin burtur á spæliplássinum, verður í so stóran mun sum gjørligt nýtt til at gerða skráar og hækka lendi kring tjørnina.

Írestandi tørvurin á fígging er sostatt 1.218 tkr. og trivnaðarstjórin hevur fráboða at 1.3 mió.kr. verða settar av  á íløguætlanini fyri 2026 til endamálið.
Trivnaðarstjórin hevur síðani heitt á mentamáladeildina, byarskipanardeildina og bygningsdeildina um at tryggja, at neyðug fígging er tøk í 2026. j.nr. 25/01675-13
Býarskipanardeildin hevur í hesum sambandi mælt til at  500 tkr. verða fluttar frá rakstrarkonto 6210 hjá býarskipanardeildini til íløgukonto L41019 hjá bygningsdeildini og verður tann parturn av málinum lagdur fyri Byggi- og býarskipnanarnevndina. j.nr. 25/05909/18

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 4140 | (41534) | Ætlanir á Skulaøkinum | 4175 | L41019 | Skúlar, uttanumøki | Verkætlan í Amerika | 370 tkr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 2.3 mió kr. |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Útreiðsluneutral flyting frá rakstri 2025 til løgu 2025 |

**Skjøl:**

25/01675-12 Tekningar -verkætlan í Amerika:
TK_ACG_X_100_STØÐUPLANUR_20250724svrFB
TK_ACG_X_101_PLANTEKNING_20250724svrFB
TK_ACG_D_001_DEILSKURÐIR-SPÆLIPLÁSSI_20250724svrFB
TK_ACG_D_002_DEILSKURÐIR-SERMYNDIR_TJØRN_20250724svrFB
25/01675 SV_ Amerika - Hvussu verður við spæliplássinum, tjørnini v.m. – Samskifti um fígging
25/05909-18 Verkætlan í spæliplássinum Amerika - 24/08171

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til, at samtykkja at flyta 370 tkr frá rakstrakonto 4140 Ætlanir á skúlaøkinum, til deild 4175, Verkætlan  L41019 Skúlar, uttanumøkið, til Verkætlan «Amerika» Eykajáttanin liggur innan fyri íløgukarmin.

Somuleiðis verður mælt til, at samtykkja at umraðfesta 212 tkr. á L41019, játtað til skúlagarðin hjá Sankta Frans skúla, til Verkætlan í Amerika.

At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 27. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Einmælt samtykt.

# 5/26 Verkætlan í spæliplássinum Amerika - 24/08171

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 189/25 | 25/05909-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 228/25 | 25/05909-18 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 269/25 | 25/05909-18 |
| 4 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 5/26 | 25/05909-18 |

Spæliplássið Amerika, sum er spæliplássið millum Sankta Frants skúla og viðarlundina, krevur grundleggjandi dagføringar, soleiðis at økið kann brúkast sum spælipláss.

**Lýsing av málinum**
Býarskipanardeildin hevur saman við Mentamáladeildini arbeitt við at gera eitt prosjekt, sum skal fáa spæliplássið Amerika á nøktandi støði. Býarskipanardeildin saman við ráðgeva, Støði, og bygningsdeildini hava prosjekterað spæliplássið hjá Sankta Frans skúla. jr.nr. 25/01675-12, har dentur varð lagdur á fylgjandi viðurskiftir:

- Drening av økinum
- Nýtt góðkent náttúrufallundirlag verður gjørt og aðrar smærri tillagingar verða gjørdar á spæliplássinum
- Gøtan oman gjøgnum økið, inn i viðarlundina verður hækkað, og ein tjørn við uppihaldsstað og gøtu rundanum verður gjørd í núverandi mýrulendinum.
- Einstøk trø og innræsnir runnar verða burturbeindir.
- Mold og eyrur, ið verður grivið burtur á spæliplássinum, verður í so stóran mun sum gjørligt nýtt til at gera skráar og hækka lendið kring tjørnina.
- Fella veik og sjúk trø.

Verkætlanin varð boðin út til tveir arbeiðstakarar, sum vórðu mettir at hava nøktandi royndir við tílíkum verkætlanum.
Tá tilboðini skuldu vera inni, var tað bert eini arbeiðstakari, Hjálpirót, ið kom við einum boði upp á arbeiðið. Tilboðið var áljóðandi kr. 2,3 mió.

Hetta lá væl omanfyri tøku fíggingina áljóðandi tkr. 1.082.
- Bygningsdeildin tkr. 212 (íløgukonto)
- Mentarmáladeildin tkr. 370 (rakstur)
- Býarskipanardeildin tkr. 500 (rakstur)

Írestandi tørvurin á fígging er so statt tkr. 1.218. Írestandi fíggingin áljóðandi kr. 1,3 mió verður fíggjað av eykainntøkunum.

Fyri at skipa verkætlanina á ein skipaðan hátt, so verður mælt til at tøka fíggingin, umframt eykajáttanin verða fluttar á eina samlaða játtan at seta verkætlanina í gongd útfrá. So statt skulu kr. 500.000 av kt. 6210, Fríðkan av býnum, flytast til kt. 4175, Dagføring av skúlum (íløgur), L41019, Skúlar, uttanumøki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Upphæddin á kr. 500.000 av kt. 6210, Fríðkan av býnum, er tøk í 2025, og tískil má upphæddin raðfestast í hesum fíggjarárinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
25/01675, útiøki hjá skúlum, umsóknir og játtan

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
25/01675-1, Viðger av umsóknum um játtan til útiøkini hjá skúlum 2022-2025
25/01675-12, Tekningar- verkætlan í Amerika

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6210 | | Fríðkan og viðlíkahald | 4175 | L41019 | Skúlar, uttanumøki | Verkætlan í Amerika | Tkr. 500 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 2,3 mió kr. |
| Áður játtað | Upphædd: | 2026 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Útreiðsluneutral flyting frá rakstri 2025 til íløgu 2025 |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at flyta kr. 500.000 av kt. 6210, Fríðkan av býnum, sum eykajáttan til kt. 4175, Dagføring av skúlum, L41019, Skúlar, uttanumøki, og at beina málið til tvær viðgerðir í býráðnum umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvør viðgerðir.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Einmælt samtykt.

# 6/26 Niðurleggja skúlan í Norðradali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 15.01.2026 | 3/26 | 25/10738-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 6/26 | 25/10738-1 |

**Upprunin til málið**
Uppskot frá leiðsluni at niðurleggja skúlan

**Lýsing av málinum**
Eingin skúlagongd hevur verið í skúlanum í Norðradali í nógv ár. Børnini har hava gingið í skúla Havn, men nú er einki skúlabarn og heldur einki barn undir skúlaaldur búsitandi í Norðradali.
Einki undirvísingarligt virksemi hevur verið í skúlanum í nógv ár, men skúlin er ikki formliga niðurlagdur, og tí verður mælt til at niðurleggja skúlan.

Kommunustýrið kann taka avgerð um at leggja ein skúla niður.

Sambært § 29 stk. 5 í fólkaskúlalógini skal tað, um so er, at eitt kommunustýríð hevur gjørt av at at leggja ein skúla niður, verða kunngjørt í teimum føroysku bløðunum. Um í minsta lagi 30% av teimum íbúgvum í viðkomandi skúlaumdømi, ið hava valrætt til kommunustýrið, seta fram innan ein mánað eftir kunngerðina skrivliga áheitan um tað, so skal kommunustýrið halda atkvøðugreiðslu um at leggja skúlan niður. Atkvøðurætt hava teir íbúgvar í skúlaumdøminum, ið hava atkvøðurætt til kommunustýrið. Landsstýrismaðurin ásetur greiniligari reglur um tílíkar atkvøðugreiðslur. Verður úrslitið av atkvøðugreiðsluni, at í minsta lagi 50% av teimum, ið hava atkvøtt, ynskja at varðveita skúlan, verður hann varðveittur.

Skúlin í Norðradali var til børn, sum búðu í Norðradali. Um kommunustýrið tekur avgerð um at niðurleggja skúlan, so kann atkvøðugreiðsla verða um niðurleggingina, um í minsta lagi 30% av íbúgvunum í Norðradali, sum hava valrætt til kommunustýrið, seta fram áheitan um tað.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 93 frá 7. mai 2025

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Einki at viðmerkja

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☒**

**Skjøl**
Ongi

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| **Býráðsfundur**<br>29. januar 2026 | Blað nr.: 22<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at Skúlin í Norðradali verður niðurlagdur.

**Trivnaðarnevndin 15. januar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:**
Annfinn Brekkstein legði fram broytingaruppskot um at skúlin í framtíðini verður eitt bygdarhús til ymisk tiltøk trivnaðinum í bygdini at gagni.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fimm atkvøðum fyri, sjey atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Lilja Blaasvær

Blankt atkvøddi: Elin Heðinsdóttir Joensen

Síðani var atkvøtt um tilmælið, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri og trimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Lilja Blaasvær, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

| | Býráðsfundur<br>29. januar 2026 | Blað nr.: 23 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

# 7/26 Gøtunavn til nýggja síðugøtu á Svalbardsvegnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 19.11.2025 | 10/25 | 25/09196-4 |
| 2 Mentamálanevndin | 26.11.2025 | 140/25 | 25/09196-4 |
| 3 Mentamálanevndin | 14.01.2026 | 6/26 | 25/09196-4 |
| 4 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 7/26 | 25/09196-4 |

**Upprunin til málið**
Børnini eftir Beintu og Eiler Jacobsen eru farin at útstykkja trøðna hjá foreldrunum, og gøta verður gjørd sambært hjáløgdu tekning. Børnini hava uppskotið, at gøtan kemur at eita “Beintugøta” ella “Beintulíð”.

**Lýsing av málinum**
Heitt verður á Gøtunavnanevndina at finna eitt navn til gøtuna.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
Skjal 25/09196-2 vísir mynd av økinum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Gøtunavnanevndin 19. november 2025:** Gøtunavnanevndin mælir til, at vegurin fær navnið «Beintulíð»

Grundgevingin er, at gøtunavnanevndin tekur undir við uppskotinum frá familjuni og hetta er í samsvari við, at fleiri vegir á økinum enda við «líð».

**Mentamálanevndin 26. november 2025:** Útsett.

**Mentamálanevndin 14. januar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>29. januar 2026 | Blað nr.: 25 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

# 8/26 Gøtunavn til síðuveg á Havnarvegnum (vinnustykki á Ovara Hjalla)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 19.11.2025 | 9/25 | 25/09234-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 26.11.2025 | 141/25 | 25/09234-3 |
| 3 Mentamálanevndin | 14.01.2026 | 8/26 | 25/09234-3 |
| 4 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 8/26 | 25/09234-3 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Tekniska umsiting heitir á Gøtunavnanevndina, um at finna navn til vegin við nýggju vinnustykkjunum á Ovara Hjalla.
Mynd liggur hjáløgd í málinum

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
Skjal 25/09234-4 er mynd av økinum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Gøtunavnanevndin 19. november 2025:** Gøtunavnanevndin mælir til, at vegurin fær navnið «á Ovarahjalla»

Grundgevingin er, at vegurin gongur eftir Ovarahjalla.

**Mentamálanevndin 26. november 2025:** Útsett.

**Mentamálanevndin 14. januar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Einmælt samtykt.

## 9/26 Nýtt gøtunavn til gøtuna til "við Tjarnir"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 19.11.2025 | 8/25 | 25/09566-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 26.11.2025 | 142/25 | 25/09566-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 14.01.2026 | 7/26 | 25/09566-2 |
| 4 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 9/26 | 25/09566-2 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Heitt verður á Gøtunavnanevndina um at finna nýtt navn til gøtuna frá Havnavegnum og oman til "við Tjarnir". Sí myndina í niðanfyri (reyða strikan).

Det sammenkædede billede kan ikke vises. Filen er muligvis blevet flyttet, omdøbt eller slettet. Kontrollér, at linket peger på den korrekte fil og placering.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. januar 2026 | Blað nr.: 28 |
| | Forkvinnunnar merki: |

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Gøtunavnanevndin 19. november 2025:** Gøtunavnanevndin mælir til, at vegurin fær navnið «Hallarvegur»

Grundgevingin er, at vegurin førir til høllina við Tjarnir.

**Mentamálanevndin 26. november 2025:** Útsett.

**Mentamálanevndin 14. januar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:**

Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot, um at gøtunavnið skal vera Atlagøta.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið bleiv samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og eini blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen og Lilja Blaasvær.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe og Bergur Robert Dam Jensen.

Atkvøddi blankt: Elin Heðinsdóttir Joensen.

Tilmælið frá Gøtunavnanevndini fall.

## 10/26 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes - 22/04933

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.09.2025 | 133/25 | 25/01098-6 |
| 2 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 227/25 | 25/01098-6 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.01.2026 | 3/26 | 25/01098-6 |
| 4 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 10/26 | 25/01098-6 |

**Samanumtøka av málinum**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* varð samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar, síðani tær gjørdust partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á, hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* eru yvirskipað viðurskifti viðgjørd við tí endamáli at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti, serstakan bygdardám og tílíkt.

Hetta málið er eitt framhald av málinum 22/04933, har byggisamtyktin fyri Hvítanes verður viðgjørd. Sí upprunamálslýsing í skjali nr. *25/01098-10, Uppruna málslýsing, mál nr. 22_04933 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes*.

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum verður mælt til, at Hvítanes fær sína egnu almennu byggisamtykt.

Mett verður ikki, at byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava líka nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt og í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Hvítanes, eru hesi ymisku økini í bygdini:
A: Miðstaðarendamál
B: Sethúsabygging
E: Almenn endamál
F: Almenn frítíðarøki
G: Neyst
F: Neyst og bátapláss
Onnur endamál

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes, sum sambært uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:
A: Bústaðarøki
B1: Havnarøki
B2: Vinnuøki
C: Miðstaðabygging
D1: Frílendi
D2: Almennir stovnar og mentan
E: Neyst

F: Frítíðarhús
G: Bóndahús
4. gr.: Landbúnaður

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í upprunaliga málinum um Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes (22/04933) og síggjast í skjalinum *Hvítanes økisásetingar - áðrenn og eftir broyting.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Upplýsingar frá umsitingini**
Uppskot um nýggja byggisamtykt fyri Hvítanes varð samtykt í býráðnum 30. mai 2024 og fór til almenna hoyring millum 18. september og 30. oktober 2024. Tá ið hoyringsfreistin var farin, hevði kommunan móttikið tvær viðmerkingar frá borgarum, umframt viðmerkingar frá náttúrufriðingarnevndini.

***Viðmerking 1 (sí Viðmerking til broyting í byggisamtykt fyri Hvítanes,msg)***
Grundstykkið 125b er sambært galdandi byggisamtykt og uppskotinum um endurskoðan, partvíst í sethúsaøki og partvíst í 4. grundumráði. Í skrivinum verður heitt á býráðið at rætta kortskjalið, soleiðis at matr. nr 125b verður heilur innan fyri sethúsaøki A.

***Viðmerking 2 (Mótmæli til broyting av byggiøkið á matr 98.docx)***
Mótmælt verður at broyta part av matr. nr 98, til byggilendi (sethúsaøki A). Í mótmælinum verður grundgivið ímóti hesi broyting út frá, at bygging á matr. nr 98 er innan fyri 100 m frá bakkatromini á fjøruni í Akkersvík, og krevur sambært § 2 stk. 2 nr. 1 í náttúrufriðingarlógini loyvi frá friðingarmyndugleika. Víst verður á, at villdunnur, æðupør og sjófuglur reiðrast í nærøkinum, og at økið verður nógv vitjað av ferðafólki.

Mælt verður tí heldur til at broyta matr. nr 98 og atliggjandi matr. nr 108a við Akkersvík til D1-Frílendi til tess at verja serstaka náttúruøkið.

***Viðmerkingar frá náttúrufriðingarnevndini (sí 5600-88130-00059-24 - Útskrift úr gerðabókini.pdf)***
Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu letur tað vera upp til Tórshavnar kommunu og góðkennandi myndugleika at økja um A1 øki fyri matr. nr. 125b, men ger vart við ásetingar í náttúrufriðingarlógini § 2 stk. 2 nr. 3 um, at ikki er loyvt innangarðs at byggja nærri enn 300 m at áum, sum eru meira enn 4 m breiðar í botninum. Á Hvítanesi er nærmasta sethúsabygging umleið 10 m frá ánni í gomlu bygdini. Við atliti til verandi bygging ásetur nevndin tí, at ikki kann byggjast nærri enn 10 m frá áum, sum eru minst 4 m breiðar á Hvítanesi.

Viðv. viðmerking 2 staðfestur náttúrufriðingarnevndin, at økið talan er um (matr. nr 98), er nærri enn 100 m frá fjøruni ella bakkanum við Akkersvík, á Kortal.fo mált til at vera frá áleið 40 m til umleið 60 m frá fjøruni. Nevndin kann ikki geva undantak ella loyva bygging á matr. nr. 98, vísandi til nevndu ásetingar í lógini.

Harafturat tekur náttúrufriðingarnevndin ikki undir við at broyta ásetingar fyri nýtt neystaøki, har loyvt er partvíst at innrætta frítíðarhús á matr nr 118 við mølina/Gjónna á Hvítanesi, fyrr enn ítøkiligar tekningar eru komnar nevndini í hendi. Grundgevingin er, at økið er nærri bakkatromini enn 100 m og fevnt av ásetingunum í § 2 stk. 2 nr. 1 í náttúrufriðingarlógini, og tí at nevndin ivast í, hvussu bygging á staðnum kemur at taka seg upp í landslagnum so nær sjóvarmálanum, tí um veturin kann tað vera sera stórur uppgangur av brimi inn yvir økið, har neystaøkið og øki til frítíðarhús ætlast at verða.

Náttúrufriðingarnevndin ynskir tískil at síggja tekningar og visualiseringar av ætlanini, áðrenn avgerð kann takast.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
Umsitingin hevur viðgjørt viðmerkingarnar og mælir til, partvíst at ganga viðmerkingunum á møti, soleiðis at uppskotið um endurskoðan verður dagført sambært nýggja kortskjalinum *Hvítanes Kort – eftir broyting, Rættað uppskot, 2025.*

Í nýggja uppskotinum eru matr. nr 98 og matr. nr 108 varðveittir í 4. grundumráði, og ikki D1 øki, sum mælt varð til sambært Viðmerking 2. Orsøkin er, at verandi áseting (landbúnaðarøki) loyvir ikki bygging, og tænir harvið endamálinum um at verja serstaka dámin við og kring Akkersvík.

Neystaøkið varð í fyrra uppskotinum víðkað sambært markinum á matr. nr 118. Uppskotið var ikki grundað á ítøkiliga byggiætlan, men heldur ein staðfesting av verandi umstøðum, og er kommunan ikki til reiðar við ítøkiligari ætlan fyri, hvussu byggjast skal fram við leiðini oman á støðna/dráttin. Mælt verður tískil til at rætta markið við neystaøkið til upprunaliga/galdandi økið, og at D1 verður galdandi fyri part av matr. nr 118. Ásetingin fyri neystaøki (E) verður broytt sambært upprunaliga broytingaruppskotinum, og verður nýggja ásetingin, sum loyvir partvísa innrættan til frítíðarbústað galdandi fyri neystini, sum í dag standa á økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- 22/04933 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes
- 20/04243 Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar

**Skjøl**
Jr nr. 22/04933-5 - *Serstøk byggisamtykt fyri Hvítanes - áðrenn broyting*
Jr nr. 22/04933-3 - *Hvítanes - endurskoðað 11.01.24*
Jr nr. 22/04933-2 - *Hvítanes økisásetingar - áðrenn og eftir broyting*
Jr nr. 25/01098-9 - *Hvítanes Kort – áðrenn broyting*
Jr nr. 25/01098-9 - *Hvítanes Kort – eftir broyting, Uppskot til fyrru hoyring*
Jr nr. 25/01098-9 - *Hvítanes Kort – eftir broyting, Rættað uppskot, 2025*
Jr nr. 22/04933-9 - *Viðmerking til broyting í byggisamtykt fyri Hvítanes.msg*
Jr nr. 22/04933-10 - *Mótmæli til broyting av byggiøkið á matr 98.docx*
Jr nr. 22/04933-4 - *5600-88130-00059-24 - Útskrift úr gerðabókini.pdf*
Jr nr. 25/01098-10, Uppruna málslýsing, mál nr. 22_04933 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið sambært skjalinum, *25/01098-9 - Hvítanes Kort – eftir broyting, Rættað uppskot, 2025*, við hesum broytingum:
- Matr. nr 98 verður verandi í 4. grundumráði.
- A1 økið verður víðkað, soleiðis at tað fylgir matr. nr. 125b.
- Markið fyri neystaøkið E verður rættað, soleiðis at tað fylgir markinum fyri verandi neystaøki.

- og at beina málið í býráðið

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Uppskotið var til hoyring í tíðarskeiðnum 29. oktober til 10. desember 2025. 16. november 2025 móttók kommunan eina umsókn um broyting av byggisamtykt matr. nr 90a, sum snýr seg um at leggja 520 fermetrar í sunnara enda av matriklinum til sethúsaøki (sí *Umsókn um broyting - matr. nr. 90a á Hvítanesi (umsókn og kort)*.

Talan er um byggisamtyktarmál, ið er viðkomandi fyri endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes, og verður umsóknin tískil viðgjørd sum partur av hesum málinum.

Grundgevingin fyri broytingin er, at onki byggiøki er eftir til sethús á Hvítanesi, síðani vegurin til Eysturoyartunnilin varð liðugur.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
Í 2019 varð søkt um at broyta byggisamtykt til sethúsaøki á sama matrikli. Tá var søkt um, at 8000 $m^2$ skuldu broytast til bústaðarøki, samsvarandi eini útstykkingarætlan við pláss fyri 5 sethúsum, (sí mál 19/04302).
Málið varð viðgjørt í Hvítanesnevndini, og kom nevndin ikki til felags niðurstøðu. Ístaðin vísti Hvítanesnevndin á 3 møguleikar:

1) Nesið skal varðveitast sum tann náttúruperla, sum tað er.
2) Umsóknin skal gangast á møti
3) Byggisamtyktin fyri Hvítanes eigur at vera endurskoðað í síni heild, heldur enn sambært einstøkum umsóknum.

Í viðgerð av málinum frá 2019, vísti umsitingin á niðurstøðu frá aðrari umsókn frá 2017, har eigari av matr. nr. 99a og 99b (sunnan fyri gongurásina út á nesið) søkti um at broyta byggisamtyktina til F fríðtíðarøki. Ætlanin var at stykkja út og gera lágvaksin summarhús á økinum. Málið var til hoyringar í Náttúrufriðingarnevndini, Yvirfriðingarnevndini og Hvítanesnevndini.
Náttúrufriðingarnevndin var sinnað at geva undantaksloyvi. Yvirfriðingarnevndin gav tó ikki loyvi til broytingina. Grundgevingin var, at undantaksloyvi ikki kann gevast sambært § 2, stk. 5 í løgtingslóg um náttúrufriðing, av tí at eyðkenni í økinum hevði broytst, um loyvt varð at byggja.

Í 2020 mælti býarskipanardeildin frá at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr 90a, og er umsitingin framvegis av tí fatan, at nesið í mest møguligan mun eigur at verða varðveitt. Í mun til grundgeving um væntandi byggilendi á Hvítanesi, vísir umsitingin á, at møguleiki er at útstykkja til bústaðarendamál sambært galdandi byggisamtykt og sambært uppskotinum um endurskoðan, eitt nú á umleið 4500 $m^2$ byggilendinum á matr. 132a, og fram við Gerðisvegi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
19/04302 Umsókn um broyting í ásetingunum fyri byggisamtyktina á matr. nr. 90a, Hvítanes
25/10203 Umsókn um broyting í ásetingunum fyri byggisamtyktina á matr. nr. 90a, Hvítanes

**Nýggj skjøl**
Jr nr. 25/10203-1 - *Umsókn um broyting - matr. nr. 90a á Hvítanesi (umsókn og kort)*

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til ikki at ganga umsóknini á møti, og at halda fast í uppskotinum um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes, sambært uppskotinum *25/01098-9 – Hvítanes Kort – eftir broyting, Rættað uppskot, 2025.* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. januar 2026:** Nevndin ynskir at ganga umsóknini á møti.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Málið beint aftur í nevnd.

# 11/26 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 30/25 | 25/01104-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 63/25 | 25/01104-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 60/25 | 25/01104-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 111/25 | 25/01104-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.01.2026 | 4/26 | 25/01104-1 |
| 6 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 11/26 | 25/01104-1 |

**Samanumtøka av málinum**
Hetta málið er eitt framhald av málinum Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað (21/03382), sí skjalið *Upprunaliga málið – Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað*.

Í 2020 varð samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi (20/04243). Upprunaliga var ætlanin at endurskoða tær galdandi serstøku byggisamtyktirnar, sum í fleiri førum ikki hava verið endurskoðaðar síðani kommunusamanlegging.

Endamálið er at broyta ásetingar, soleiðis at tær bæði samsvara betri millum bygdirnar í kommununi (javnseta bygdirnar) og við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, harafturat verður í ávísum førum viðmælt at tillaga byggisamtyktarmørk. Á hendan hátt er tað bæði lættari at skilja og umsita byggisamtyktirnar fyri bygdirnar í kommununi.

Fyrsta uppskotið um at endurskoða serstøku byggisamtyktina fyri Velbastað varð samtykt 28. oktober 2021 og lá til almenna hoyring millum 1. nov. 2021 til 13. des. 2021. Kommunan móttók 3 mótmælir og mælti umsitingin frá at ganga teimum á møti.

Málið varð samtykt og síðani sent landsmyndugleika til góðkenningar. Í skrivi frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, dagfest 27. september 2022, verður heitt á kommununa, at bygdirnar í Tórshavnar kommunu framyvir vera reguleraðar í almennu byggisamtyktini, ella við hvør sínari almennari byggisamtykt. Umsitingin hevur síðani gjørt uppskot um almenna byggisamtykt fyri Velbastað, sí skjal *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað*.

**Lýsing av málinum**
Uppskotið varð samtykt í byggi- og býarskipanarvendini 12 februar í 2024, men varð av misgáum ikki lagt aftur fyri Velbastaðnevndini fyrr enn í desember 2024. Umsitingin sendi tilfarið umvegis teldupost og Velbastaðnevndin hevði hesar viðmerkingar:

**Viðmerkingar frá velbastaðarnevndini:**

*Málið hevur verið fyri hjá okkum fyrr, og kunnu vit vísa til tær viðmerkingar sum eru gjørdar tá. Eisini hava vit hesar viðmerkingar at leggja afturat:*

1) *Vit ynskja at hetta málið verður viðgjørt eins og málið í Kirkjubø. Málið á Velbastað er sent til staðbundnu nevndina, meðan í Kirkjubø er sent til almenna hoyring.*
2) *Rættast hevði verið við einari almennari kunning í báðum bygdunum.*
3) *Í nýggju byggisamtyktini hevur man broytt økið F (Almenn fríøki) til D2 (Almennir stovnar og mentan). At taka fríøki úr samtyktini ger, at tú hevur møguleika at byggja á hesum økjum, og sostatt eru ongi almenn fríøki á Velbastað. Hesum mótmæla vit.*
4) *Í fleiri av ásetingunum verður orðingin «og tílíkt» nýtt, og meta vit at hetta er óheppið, tá tað hetta kann boyggjast og vendast, alt eftir hvørji áhugamálini eru.*

Umsitingin svaraði Velbastaðnevndini 16. desember 2024.

*Til 1 og 2:*
*Málið verður eftir ætlan lagt fyri býráðið í januar 2025, og fer síðani, eins og endurskoðanin av Kirkjubø, út til almenna hoyring í minst 6 vikur. Í hoyringstíðarskeiðnum er ætlanin at umsitingin leggur uppskotið fram, og borgarar fáa høvið at spyrja inn til og viðmerkja málið, á kunnandi borgarafundi í Velbastað.*

*Til 3:*
*Hesa viðmerking ynskja vit at fáa lýsta nærri, tí sambært viðmerkingini verður øki F í verandi byggisamtykt lagt til almenn fríøki, meðan verandi byggisamtykt lýsir F sum alment frítíðarøki (ítróttarvøllir, spælipláss útiverupláss o.t.).*
*Sambært uppskotinum kemur D2 ístaðin fyri bæði E (almennir stovnar) og F (almenn frítíðarøki), og metir umsitingin at D2 (almennir stovnar og mentan) rúmar bæði endamál.*

*Til 4:*
*Orðingin "og tílíkt" er afturvendandi fyri allar almennu byggisamtyktirnar í Tórshavnar kommunu, umframt galdandi byggisamtykt fyri Velbstað og Kirkjubø. Endamálið er at avmarkað talið av økispørtum og at varðveita ein ávísan fleksibilitet í umsitingini, sum kann vera ein fyrimunur bæði í samband við byggimálsviðger og fyri menning av bygdini. Tað er tó lætt at ímynda sær at orðingin verður brúkt til at fevna um nýtslu, sum ikki hóskar, og verður viðmerkingin tikin til eftirtektar.*

Umsitingin mælir til at leggja uppskotið, sum lýst í hesum málinum fyri býráðið og síðani til almenna hoyring.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í málinum 25/00818, verður mælt til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður, frá E (almennir stovnar) til B (sethús) sambært galdandi serstøku byggisamtykt. Hetta er í sambandi við at f频skúlin niðurleggur virksemið, og ynskið er at selja ognina.

Sambært uppskotinum um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað, verður matr. 50ø broyttur frá E øki til D2 økið (almennir stovnar), og tískil kemur hetta ikki at samsvara við tilmælið í máli 25/00818, um broytingin til sethús verður góðkend.

Umsitingin mælir til, at atlit verður tikið til mál nr 25/00818, soleiðis at tilfarið sum verður sent til endaliga viðgerð, annaðhvørt lýsir matr. nr 50ø sum A bústaðarøki ella sum E almennir stovnar, treytað av endaligu viðgerðini av máli nr 25/00818.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 21/03382
- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243
- *Fyrispurningur um broyting av byggisamtykt, galdandi fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður - 24/08611,* journal nr. 25/00818

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað,* journal nr. 25/01104-2.

- *Kort – áðrenn broyting,* journal nr. 25/01104-2
- *Kort – eftir broyting,* journal nr. 25/01104-2.
- *Velbastað – áðrenn og eftir– Tekstur,* journal nr. 25/01104-2.
- *Upprunaliga málið – Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 25/01104-4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað sambært skjølunum *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað* og *Kort – eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

Uppskotið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

**Viðmerkingar frá Kirkjubøar/Velbastaðarnevndini:**

*<u>Viðmerkingar til mál 21/03382. Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað.</u>*

*Málið hevur verið fyri hjá okkum fyrr, og kunnu vit vísa til tær viðmerkingar sum eru gjørdar tá. Eisini hava vit hesar viðmerkingar at leggja afturat:*

*1) Vit ynskja at hetta málið verður viðgjørt eins og málið í Kirkjubø. Málið á Velbastað er sent til staðbundnu nevndina, meðan í Kirkjubø er sent til almenna hoyring.*

*2) Rættast hevði verið við einari almennari kunning í báðum bygdunum.*

*3) Í nýggju byggisamtyktini hevur man broytt økið F (Almenn fríøki) til D2 (Almennir stovnar og mentan). At taka fríøki úr samtyktini ger, at tú hevur møguleika at byggja á hesum økjum, og sostatt eru ongi almenn fríøki á Velbastað. Hesum mótmæla vit.*

*4) Í fleiri av ásetingunum verður orðingin «og tílíkt» nýtt, og meta vit at hetta er óheppið, tá tað hetta kann boyggjast og vendast, alt eftir hvørji áhugamálini eru.*

Á býráðsfundinum 27. februar 2025 gjørdu býráðslimir vart við viðmerkingarnar frá staðbundnu nevndini, og ivamál var, um byggi- og býarskipanarnevndin hevði tikið viðmerkingarnar til eftirtektar. Víst verður til viðmerkingarnar omanfyri.

Býráðslimir mettu, at av tí at talan er um ógreið viðurskiftir og stórar prinsipiellar broytingar, so var best, at uppskotið varð dagført samsvarandi viðmerkingunum frá staðbundnu nevndini, og at uppskotið harvið verður meira klárt, áðrenn uppskotið verður lagt til almenna hoyring.

Umsitingin ásannar, at broytingar av galdandi byggisamtykt krevja gjølla viðgerð, harímillum móttiknu viðmerkingarnar frá staðbundnu nevndini. Umsitingin viðmælir tó, at verandi uppskot, sum er lýst í hesum málinum, verður lagt fyri býráðið og síðani til almenna hoyring. Í hoyringstíðarskeiðnum verður almennur borgarafundur fyriskipaður á Velbastað, soleiðis at borgarar kunnu fáa neyðugt innlit í málið, og síðani viðmerkja. Á henda hátt verður møguleiki at samla so nógvar viðmerkingar og sjónarmið sum gjørligt, áðrenn endaliga viðgerðin av málinum verður gjørd og møguligar dagføringar av uppskotinum verða gjørdar.

Hetta er sami leistur, sum hevur verið nýttur í sambandi við endurskoðanina av byggisamtyktunum fyri Kirkjubø, Nólsoy, Hvítanes og Kaldbak.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað sambært skjølunum *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað* og *Kort – eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Uppskotið lá til almenna hoyring í tíðarskeiðnum 19. juni til 10. september 2025. Í hesum sambandi var kunnandi borgarafundur á Velbastað 3. september 2025. Tá ið freistin at viðmerkja var farin, hevði kommunan móttikið tvey hoyringarskriv (sí skjal *Viðmerkingar og broytingaruppskot*). Niðanfyri er ein samanumtøka av viðmerkingunum og svar frá umsitingini.

**Mótmæli frá Dánjal Paula í Búðini, Ólavi Brimnes og Sveini Zachariasen umboðandi part av staðbundnu nevndini:**

1. Frámælt at 5 F økir (alment frítíðarøki) verða broytt til D2 (almennar stovnar)

*Í galdandi byggisamtykt er munur á F-økið, (almenn frítíðarøkið) og E-økið (almennir stovnar). Í nýggja uppskotinum eru øll F-økini broytt til D2 (almennar stovnar, ítrótt, mentanarlig endamál v.m.). Hetta verður mett at vera óheppið og óhóskandi fyri fleiri av økjunum (ítøkiliga verður víst á 5 økir), og áttu hesi økini ístaðin fyri at verið broytt til D1 (frílendi), soleiðis at tey verða varðveitt sum frílendi. Sambært skrivinum eru økini í dag virðismikil náttúruøkið sum børn og onnur hava gleði av, og er ynskið at tey vera varðveitt til hetta endamálið.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Ætlan er ikki at staðseta almennar stovnar í teimum 5 F-økjunum, sum víst verður til í hoyringsskrivinum. Umsitingin er tískil samd í, at D1 er hóskandi áseting fyri hesi økini, og verður uppskotið tillagað sambært tilmælinum.

2. K-økið (Landbúnaður) verður broytt til 4. grundumráði

*Mett verður, at tað ikki er rætt at broyta galdandi K-økið til 4. grundumráði. Orsøkin er at ásetingar fyri 4. grundumráði víðka um heimildirnar fyri hvat kann byggjast uttan fyri bøgarðarnar. Í nýggja uppskotinum verður 4. grundumráði lýst soleiðis:*

*"4. grundumráði verður lagt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.",*

*Orðið "tílikt" kann boyggjast í mun til hvør lesur tað, og funnist verður somuleiðis at hesi orðing:*

*"Onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, kann staðsetast í 4. grundumráði."*

*Mælt verður til, at halda seg til verandi áseting sum er galdandi fyri K, har tað er greitt at umráðisparturin er lagdur til landbúnað.*

<u>Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:</u>
Umsitingin er samd í, at heimildin fyri nýtslu í 4. grundumráði er sera breið og tískil ikki lýsir nágreiniliga, hvat kann og hvat ikki kann byggjast. Munur er eitt nú á landbúnaðarvirksemi, smærri bygging í sambandi við ferðavinnu og vindmyllur, sum er alt virksemið sum sambært byggisamtyktini kann rúmast í umráðispartinum.

Tó verður mælt frá at varðveita ásetingarnar fyri K-øki í haganum kring Velbastað. Orsøkin er, at nýtslan í galdandi áseting somuleiðis er breið, og ein varðveitan av økispartinum K stríðir ímóti endamálinum um, at ásetingar, sum í størri mun samsvara við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu og hinar bygdirnar í kommununi, skulu vera eins. Um hagin kring Velbastað hevur aðrar ásetingar enn hagin kring aðrar bygdir í kommununi, verður hetta í fyrstu atløgu umsitingarliga fløkjasligt at umsita og at dagføra í eini heild.

Mælt verður til, at umsitingin í nýggjum máli fer undir at lýsa og nágreina nýtsluna í 4. grundumráði í síni heild fyri alla kommununa, sambært eini lendisætlan. Í hesum málinum skulu viðmerkingarnar í sambandi við 4. grundumráði í hesum málinum, takast til eftirtektar.

3. Víðkan av D1 økinum við Mýandalsá

*Í galdandi byggisamtykt er økið við Mýandalsá H: Frílendi broytt til D1: Frílendi. Í broytingaruppskoti verður mælt til at víðka hetta økið norðureftir.*

<u>Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:</u>
Mett verður, at náttúruvakra økið fram við ánni hóskar sum D1 frílendi, og er nýtt uppskot gjørt, har D1 økið er víðkað norðureftir sambært broytingaruppskotinum.

**Í mótmæli við 78 undirskriftum:**

1. F-økini skulu broytast til D1 heldur enn D2.

*Eins og í viðmerking 1 verður víst á, at fleiri D2 økir sambært uppskotinum, høvdu hóskað betur sum D1 økir.*

<u>Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:</u>
Vísandi til viðmerking 1 hevur umsitingin gingið hesi viðmerking á møti.

2. Bústaðarøki sunnanfyri Mýandalsá

*Bústaðarøki sunnan fyri Mýandalsá (á matr 50a) er alt ov tætt við ánna og fossin, og eigur at verða minkað tilsvarandi, soleiðis at tað lýkur krøvini um frástøðu frá áum og fossum, og verður partur av D1 øki.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Stóra óbygda byggiøkið hevur mark við ánna, og hevur umsitingin í uppskoti rættað markið, soleiðis at byggiøkið verður flutt frá ánni eftir marki, sum verður mett hóskandi. Harafturat hevur umsitingin broytt E øki (almennur stovnur) til A øki, av tí at ongin útstykkingarætlan er fyri økið, og harvið er ikki greitt, júst hvar ein møguligur stovnur hevði hóskað seg, um tað eina ferð í framtíðini verður ústykkjað.

3. Mint verður á orðing í samanleggingarsáttmálanum millum Kirkjubøar og Tórshavnar kommunu

*Orðingin er soljóðandi:*
*"Kirkjubøur og Velbastaður verða varðveittar sum bóndabygdir og koma at bera dám av hesum. Dyrkað jørð, bæði innan og uttangarðs, eigur í hesum sambandi, í mest møguligan mun, at verða varðveitt sum landbúnaðarjørð. Fyrilit skal vísast fyri dyrkbærum lendi, sum, í mest møguligan mun, eigur at verða arðveitt sum lendi, ið kann dyrkast."*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Henda orðing hevur týdning fyri byggisamtykt, í mun til hvørt langtíðarendamálsynski er um at røkka, og mælir umsitingin til, at orðingin, frá samanleggingarsáttmálanum verður varðveitt undir innleiðandi brotinum «Endamál» í uppskotinum um byggisamtykt fyri Velbastað.

4. K økið skal varðveitast

*At enda verður, eins og í viðmerking 2, staðiliga mælt til, at § 10, áseting fyri 4. grundumráði skal strikast.*

*Trupulleikin við ásetingum fyri 4. grundumráði er, at møguliga nýtslan í økispartinum er víðopin, Víst verður til málið um matstovu/gistingarhús við Fossdalsgjógv, tá ið Tk gjørdi uppskot um serstaka byggisamtykt fyri Fossdalsgjógv vísandi til, at allar bygdir í Tórshavnar kommunu vóru í 4. grundumráði. Hetta hevði TK, sambært mótmælinum ikki heimild til, tí at byggisamtyktin fyri Velbastað er galdandi og harvið øki K.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Víst verður til viðmerkingarnar, sum umsitingin hevði til pkt. 2 í fyrra hoyringsskrivinum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Byggimálsdeildin viðmerkti uppskotið um endurskoðan av Kaldbak og Kirkjubø, og hevur umsitingin í hesum sambandi gjørt fylgjandi broytingar í sambandi við endurskoðanina av Velbastað:
1) Byggi- og nýtslustigini eru broytt frá einum til tveir desimalar.
2) Upplýsingar til møguliga heildarætlan eru nágreinaðar og lagdar afturat í breddanum.
3) P-krøvini eru broytt, soleiðis at tey eru galdandi fyri bústaðarøkir burturav (Kap III § 3).

**Nýggj skjøl**
*j.nr. 25/01104-13 Kort – Velbastað eftir broyting, nov 2024*
*j.nr. 25/01104-11 Viðmerkingar og broytingaruppskot*
*j.nr. 25/01104-12 Kort - Velbastað eftir broyting, dagf. des. 2025*
*j.nr. 25/01104-12 Almenna byggisamtyktin fyri Velbastað, uppskot des 2025*
*j.nr. 25/01104-12 Almenna byggisamtyktin Velbastað uppskot des 2025 – við markeraðum broytingum*

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið sambært skjalinum *Kort - Velbastað eftir broyting, dagf. des. 2025* og *Almenna byggisamtyktin Velbastað dafg, des 2025* og beina málið í býráðið.

Mælt verður til, at umsitingin fær heimild at stovna mál, har farið verður undir at broyta ásetingar fyri 4. grundumráði fyri alla kommununa, har viðmerkingarnar í hesum málinum vera nærri viðgjørdar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. januar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:**
Annfinn Brekkstein legði fram broytingaruppskot um at beina málið aftur í nevnd.
Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Anja Weyhe og Bergur Robert Dam Jensen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Kristianna Winther Poulsen og Lilja Blaasvær.

# 12/26 Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 7, matr. nr. 1314 - Grannalág

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.01.2026 | 26/26 | 25/08430-5 |
| 2 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 12/26 | 25/08430-5 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 1314, Tórshavn hevur arbeitt við skipan av økinum, og søkir í tí sambandi um at broyta serstøku byggisamtykina fyri økið, serstøku byggisamtykt nr. 7 fyri Eysturbýin.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við umsóknina hevur eigarin latið inn faldara, ið greitt lýsir endamálið og ynskið fyri økið, sí skjal *Grannalág_reduceret*. Faldarin lýsir inentónirnar, hvør bygging er ynskt, umframt hvørji býarskipanarlig atlit annars verða tikin í eini størri heild. Ítøkiliga skipanin av økinum verður ikki sum víst í faldaranum, men greiningar og meginreglurnar eru tær somu.

Ynskið er at skipa økið við íbúðarbygging í fleiri hæddum. Byggingin er fyrst og fremst staðsett við vestara og norðara mark av ognini, kring eitt størri opið fríøki í landsynningshorninum.

Matr. nr. 1314 liggur á markinum millum vinnuøkið á Óðinshædd, rað-/íbúðarbyggingina á Óðinshædd og sethúsaøkið í Stoffalág, og roynir verkætlanin at knýta økini saman – bæði við bygging, ið so líðandi gerst lægri, frá stóru vinnubygningunum oman móti lágu sethúsunum, og við fríøki og farleiðum, ið knýta kringøkini saman, og eru til nýtslu hjá øllum brúkarum av nærøkinum.

Fleiri møguleikar fyri atkomu til økið hava verið umrøddir. Íbúðarbyggingin fevnir um eini 130 bústaðir, og tískil verður mett, at væntaða økta ferðslutrýstið verður ov stórt umvegis sethúsavegirnar í Lágni og Stoffalág/Breiðablik. Tí verður mett, at neyðugt er við eini atkomu afturat. Sum økið liggur, er natúrligt, at triðja atkoman til økið verður umvegis Mannaskarð, sum er kommunalur vegur. Mannaskarð gongur ikki heilt inn til økið, og tí verður neyðugt at fáa avtalu í lag ella ognartaka til vegatkomu til stykkið.

Bústaðartrýstið í høvuðsstaðnum er stórt, og her er talan um eitt stórt óbygt bústaðarlendi í býnum, og tí verður mett neyðugt at fara undir eina tilgongd at tryggja nøktandi atkomu til økið.

Matr. nr. 1314 liggur í serstøku byggisamtykt nr. 7, í økjunum A2, ætlað sethúsum, B4, ið er ætlað tvíhúsum, raðhúsum og teimum líkum bústøðum, umframt C1, ið er lagt til almenning, har ikki má byggjast. Um ynskta verkætlanin skal kunna fremjast, má A2, sethúsaøkið broytast til B4 øki, ið er ætlað tvíhúsum, raðhúsum og teimum líkum bústøðum, umframt at C1, økið til almenning skal broytast eitt vet. Sí fylgiskjal nr. 1 í skjal *Serstøk byggisamtykt nr. 7 – 06.01.2026,* journal nr. 25/08430-13.

Hóast B4 økið ikki beinleiðis er ætlað íbúðarbygging, so hevur orðingin “og teimum líkir bústaðir” verið nýtt soleiðis, at íbúðir eru at meta sum “teimum líkir bústaðir”, og er m.a. íbúðarverkætlanin hjá Bústøðum á matr. 1322k somuleiðis staðsett í einum B4 øki. Hóast henda siðvenjan hevur verið, so verður tað mett ráðiligt at broyta orðingina fyri B4 øki, soleiðis at íbúðir ítøkiliga verða nevndar. Sí GR. 2 í skjal *Serstøk byggisamtykt nr. 7 – 06.01.2026,* journal nr. 25/08430-13.

Serstaka byggisamtykt nr. 7 ásetur, at bygging í B4 øki má einans verða í samsvari við góðkenda heildarbyggiætlan fyri hvørja B-eind ella náttúrligan part av henni, men annars eru ongar ítøkiligar treytir til vavið av hesari bygging. Tískil eru tað ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri A1 øki, ið eru galdandi, og har stendur m.a., at í serstakari byggisamtykt kann vera loyvt at byggja hægri, enn ásetingarnar í almennu byggisamtyktini, umframt at loyvi kann vera givið at byggja íbúðir.

Støðumyndin við lýstum hæddum, ið umsøkjarin hevur latið inn, verður at rokna sum ein “heildarbyggiætlan” sambært treytunum fyri bygging í B-eindunum í serstøku byggisamtykt nr. 7 (Gr. 5).

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
Ásetingar fyri A1 øki eru m.a.:
- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
- Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.
- Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Økið liggur í A2, B4 og C1 øki í serstøku byggisamtykt nr. 7.
Ásetingar fyri A2 øki eru m.a.:
- Við teimum undantøkum, ið eru nevnd niðanfyri undir felagsásetingum, skulu eindirnar ikki verða nýttar uttan til sethús og bygd mugu verða einans stakhús, ið standa fyri seg. Á hvørjari ogn kunnu ikki verða bygd uttan eini sethús, við í mesta lagi tveimum íbúðum.

Ásetingar fyri B4 øki eru m.a.:
- Við teimum undantøkum ið nevnd eru niðanfyri undir felagsásetingum, skulu eindirnar ikki verða nýttar uttan til bústaðir, og bygd mugu, einans verða tvíhús, raðhús og teimum líkar bústaðir.
- Bygt má einans verða í samsvari við góðkendari heildarbyggiætlan fyri hvørja B-eind ella náttúrligan part av henni.

Ásetingar fyri C1 øki eru m.a.:
- C1 verður lagt sum almenningur.

Sí annars skjal *Serstøk byggisamtykt nr. 7 – 06.01.2026,* journal nr. 25/08430-13.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tørvur er á fleiri bústøðum í høvuðstaðnum, og tí er umráðandi, at verandi byggilendi verður gagnnýtt á mest skynsaman hátt. Umsøkjari hevur í tilgongdini við umsitingini ment verkætlanina, soleiðis at hendan lagar seg til kringumstøðurnar og soleiðis at felagshentleikar og fríøkir hava fingið nøktandi rúmd.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið er viðgjørt í samstarvi við Byggimálsdeildina, Teknisku deild og Umhvørvisdeildina.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☒**

**Skjøl**
- *Serstøk byggisamtykt nr. 7 – 06.01.2026,* journal nr. 25/08430-13.
- *Grannalág_reduceret,* journal nr. 25/08430-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til broyting av serstøku byggisamtykt nr. 7 smb. skjalinum *Serstøk byggisamtykt nr. 7 – 06.01.2026,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. januar 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, tekur undir við broytingini undir grein 2 í serstøku byggisamtykt nr. 7, har "íbúðir" verður sett inn í tekstin undir Eindirnar B1, B2, B3 og B4, Raðhúsabygging, men tekur ikki undir við broytingini í kortskjalinum fyri matr. nr. 1314 og fylgiskjali Heildarætlan fyri matr. nr. 1314.

Kári Johansen tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:**

Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í Byggi- og býarskipanarnevndini, og tað varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri og trimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Lilja Blaasvær, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

# 13/26 Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1233a, 1233b, 1378 og 1235a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.01.2026 | 27/26 | 25/08554-7 |
| 2 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 13/26 | 25/08554-7 |

**Upprunin til málið**
Tá ið fyrrverandi eigari av matr. nr. 1233a og 1233b heitti á kommununa, at gera serstaka byggisamtykt fyri umrøddu matriklar, vísti kommunan á, at alt óbygda økið (matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og 1233b) millum Skotarók og Oyggjarvegin eigur at verða skipað í síni heild, og at dámurin so vítt møguligt skal hóska til útstykkingina, Skotarók, sunnan fyri økið, sum er skipað við sethúsabygging.

Av tí at eigarar av øllum matriklunum í økinum ikki samdust um eina felags loysn, varð stig tikið til fundir við eigararnar á sumri 2023, og gjørdi umsitingin eitt boð uppá eina skipan av økinum. Serstaka byggisamtyktin millum Skotarók og Oyggjarvegin kom í gildi 28. apríl 2025. Sambært serstøku byggisamtyktini kunnu í mesta lagi 60 íbúðir byggjast, og verður økið við einum nýggjum bústaðarvegi sundurbýtt í tvey byggiøkir, har byggjast kann upp í 2 hæddir niðanfyri vegin og upp í 3 hæddir omanfyri vegin (sí *Serstøk byggisamtykt millum Skotarok og Oyggajrvegin við átekning*).

Í vár móttók kommunan uppskot um ítøkiliga heildarætlan fyri allar matriklarnar millum Skotarók og Oyggjarvegin, umframt eina ítøkiliga umsókn um íbúðarverkætlan á matr. nr 1233a og b. Heildarætlanin fyri økið sýnir eina góða skipan av øllum økinum, har byggingin tekur atlit til byggingina sunnan fyri økið, samstundis, sum økið verður optimerað við fleiri íbúðareindum. Sí partar av heildarætlanini í skjal nr. *25/08554-13 – 26.01.15_Heildarætlan - Við oyggjarvegin.*

Uppskotið fyri matr. nr 1233a og b lýsir eina bústaðarverkætlan við 30 bústaðareindum, og er hugsað út frá eini møguligari framtíðar skipan av ferðsluni, við rundkoyring við Vestara Ringveg og Oyggjarvegin, sum verður knýtt í nýggja bústaðarvegin til íbúðarbyggingina á matr. nr 1233a og b.

Samlað verður mett, at nýggja innlatnað heildarætlanin fyri alt økið gevur góða meining í mun til at gagnnýta lendið innan fyri verandi bý. Av tí at henda samlaða heildarælտanin sýnir fleiri bústaðareindir, umframt at byggingin í pørtum av økinum fer upp í 4 hæddir, so snýr hetta málið seg um at broyta byggisamtyktina, soleiðis at skipanin av økinum verður optimerað og harvið gevur býnum best gagn.

**Lýsing av málinum**
Umsitingin hevur síðani apríl havt leypandi fundir við umsøkjarar, umframt at arbeitt hevur verið við eini dagførdari býarskipan fyri kommununa, sum tekur atlit til bygging av fleiri bústøðum, samstundis sum fyrilit verða havd fyri náttúru, lívmargfeldi og trivnaði. (sí mál *Býarskipan 2025*). Uppskotið frá umsøkjara lýsir fyrst og fremst bygging á norðastu matriklunum (matr. nr 1233a og 1233b), men er samstundis gjørt við eini heildarætlan fyri, hvussu tað óbygda økið kann mennast í framtíðini, sí skjal *25/08554-13, 26.01.15_Heildarætlan - Við oyggjarvegin.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og 1233b liggja í umráðispartinum A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har tað m.a. er ásett:

- Byggistigið má ikki fara upp um 0,3 og nýtslustigið 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir.
- Hús mugu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Verða hús bygd við

einvegis takhalli ella sløttum takið kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Somuleiðis er *Serstøk byggisamtykt millum Skotarok og Oyggajrvegin við átekning* galdandi fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mett verður, at tilfarið frá ráðgevum lýsir eina skynsama lendisnýtslu og dámliga skipan av økinum. Umframt nøktandi fríøki og felagshentleikar stendur skapið og hæddin á bygningum ikki í andstøðu til sethúsaøkið sunnan fyri. Verkætlanin kann byggjast í fleiri stigum, men í hesum sambandinum verður tað mett neyðugt at strika orðing, sum nágreinar, hvussu nógvar íbúðareindir kunnu byggjast tilsamans. Mett verður, at tað ikki er neyðugt at áseta ítøkiliga íbúðartalið 60, og at ásetingin kann gera samlaðu byggingina fløkjasliga at menna, og kann avmarka eina smidligari menning av íbúðarnýtslu í framtíðini.

Framtíðar ferðsluloysnin, sum lýst í tilfarinum frá ráðgevum, er áhugaverd og eisini møguliga tann rætta. Í máli nr. *25/10810*, *Íbinding frá útstykkingarætlan við Oyggjarvegin á matr. nr. 55-1233a,* er samtykt, at umsitingin skal arbeiða víðari við málinum um staðseting av rundkoyring á Vestara Ringvegi og møguligari alternativari loysn. So statt er verandi atkoma til økið, soleiðis sum verandi serstaka byggisamtykt lýsir.

Umsitingin metir tað vera týdningarmikið, at íbúðarbygging á matr. nr. 1233a ikki forðar hesi ferðsluloysnini í framtíðini, og verður byggiøki A í fylgiskjal 2 tískil flutt samsvarandi eini møguligari framtíðar rundkoyring í økinum. Sí skjal *Serstøk byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin, broytt 13.01.26.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *J.nr. 25/04377 - Býarskipan 2025*
- *J.nr. 25/01093 - Heildarætlan fyri matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og b - 22/07222*
- *J.nr. 25/10810 - Íbinding frá útstykkingarætlan við Oyggjarvegin á matr. nr. 55-1233a*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
- J.nr. 25/01093-5 - *Serstøk byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin við átekning*
- J.nr. 25/01093-12 - *Serstøk byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin, broytt 13.01.26*
- J.nr. 25/01093-12 – *Serstøk byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin - markeraðar broytingar.*
- J.nr. 25/08554-13 – *26.01.15_Heildarætlan - Við oyggjarvegin*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:

Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtyktina fyri Skotarók og Oyggjarvegin sambært *Serstøk byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin, broytt 13.01.26, har m.a.:*

- Markið fyri nøgd av búðeindum verður strikað
- Snið á íbúðarbygging verður nágreinað sambært tilfari frá ráðgevum
- Atlit verður tikið til møguliga framtíðar ferðsluloysn við rundkoyring

Og at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. januar 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur støðu á seinni fundi.

Birgir Nielsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, tveimum ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Lilja Blaasvær.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Atkvøddu blankt: Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekstein

Birgir Nielsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

# 14/26 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1038k, 1038i, 1038h, 1038g, 1038f og 1038e, Eystan Heyg. Frá sethúsabygging til íbúðarbygging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.01.2026 | 25/26 | 25/05584-11 |
| 2 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 14/26 | 25/05584-11 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av ognunum ynskir at byggja íbúðarbygging á ognunum. Økið liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, ið er ætlað sethúsabygging. Ætlanin er at byggja íbúðir, ið eru 45 og 65 $m^2$ til víddar – málbólkurin er ung, havandi í huga nærleikan til nýggja campus økið. Sí nærri lýsing í skjalinum *Tekningar byggisamtykt*.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við yvirskipaða ynskið um at gagnnýta avmarkaða lendið í Tórshavnar kommunu á mest skynsama hátt og býartætta, verður mælt til, at tað í ávísum egnaðum sethúsaøkjum verða bygdar íbúðir ístaðin fyri sethús – hetta fyri at tryggja eina skynsama lendisnýtslu og burðardygga býarmenning. Uppskot um at gera nýggjan umráðispart til tílíka bygging í almennu byggisamtyktini er lagt til politiska støðutakan, sí mál *Nýggjur umráðispartur í almennu byggisamtyktini. A4 – tøtt og lág bústaðabygging.*

Eitt av økjunum, ið verður mett egnað at skipa á henda hátt, eru ognirnar hjá umsøkjara, matr. nr. 1038k, 1038i, 1038h, 1038g, 1038f og 1038e. Av tí at talan er um íbúðarøki millum – ella tætt upp at – sethúsaøkjum, eru byggiregulerandi ásetingarnar fyri nýggja A4 økið at sammeta við tær fyri A1 – sethúsaøki. Tað vil millum annað siga, at mest loyvda byggistig er 0,30, mest loyvda nýtslustig er 0,70 og mest loyvda hædd er tann sama, sum í vanligum sethúsaøkjum. Munurin er, at tað í hesum nýggja umráðispartinum ber til at skipa økið sum íbúðarøki við t.d. felags parkeringsøki og hentleikum annars, umframt at til ber at sundurbýta íbúðirnar í eigaraíbúðir.

Um økið verður lagt sum øki til íbúðarbygging sambært uppskotinum til nýtt A4 øki, er ikki neyðugt at gera serstaka byggisamtykt, ið skipar økið neyvari, men verður málið avgreitt sum eitt byggimál. Hetta merkir, at umsøkjari í umsókn um broyting av byggisamtykt ikki nýtist at koma við neyvum tekningum av ætlanini, men bert lýsa ætlaninar yvirskipað. Hetta merkir somuleiðis, at hóast tekningar eru latnar inn í sambandi við umsókn um broyting av almennu byggisamtyktini, og hendan verður broytt, so er endaligt loyvi ikki givið til verkætlan sambært tekningunum, ið eru latnar inn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
  Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Uppskot til ásetingar fyri nýtt A4 øki í almennu byggisamtyktini, sí mál *Nýggjur umráðispartur í almennu byggisamtyktini. A4 – tøtt og lág bústaðabygging:*

1. Umráðisparturin verður lagdur til opna/lága bústaðabygging.
   Byggivaldið kann geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyrir býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum bústaðarøki og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

   Opin/lág bústaðabygging er bygging, sum í vavi er at sammeta við sethúsa- og tvíhúsabygging.

2. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

   Tórshavnar kommuna hevur gjørt eina reglugerð um flokking av virkjum, sum ásetir fjarstøðu, ið mett verður at vera neyðug millum viðkomandi virkir og bústaðarøkir. Hendan reglugerð er góðkend av býráðnum 19. februar 2009 mál nr. 2007-1253.

3. Skipanin av økinum skal taka atlit til og hóska til kringliggjandi bústaðarøki.

4. Minst 20% av samlaðu víddini fyri eitt natúrligt avmarkað øki, skal vera lagt til tilhaldspláss.

   Natúrligt avmarkað øki í mun til lendi, skap, mørk (t.d. vegir), bygging, dámin í økinum o.a.
   Tilhaldspláss eru øki, ið kunnu nýtast til uppihald, spæl, trivna og líknandi.
   Tilhaldspláss eru ikki øki, ið verða nýtt til parkering, reinsiverk, vegir og líknandi.

5. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,30.

6. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,70.

7. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

8. Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.

   
   

9. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 til hægsta punkt við útvegg.

   
   

10. Mest loyvda longd á hvørjari framsíðu er 20 m.

    5 m skulu verða millum hvørja framsíðu.

11. Loyvd skelting í hesum umráðisparti er sum víst á talvu niðanfyri og sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

    Tórshavnar kommuna hevur gjørt eina skeltisreglugerð, góðkend av býráðnum 19. september 2024 mál nr. 22/02144.

| | Tænastu-skelti | Lýsingar-skelti | Vinnu- og stovnsskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x, einans “Skelti-virki í egnum bústaði |

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í fyrsta umfari var talan um at gera uppskot til serstaka byggisamtykt fyri ognirnar, soleiðis at íbúðarbygging kundi loyvast, men í sambandi við arbeiðið við Býarskipan 2025, har tað er eitt yvirskipað ynskið um at býartætta og at gera tilgongdina at byggja íbúðir smidligari, er mál stovnað um at gera nýggjan umráðispart í almennu byggisamtyktini, A4, ið loyvir tættari og lágari bygging (íbúðarbygging í tveimum hæddum), sí

mál *Nýggjur umráðispartur í almennu byggisamtyktini. A4 – tøtt og lág bústaðabygging.* Hetta málið er treytað av, at málið um nýggjan umráðispart verður samtykt og góðkent.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Nýggjur umráðispartur í almennu byggisamtyktini. A4 – tøtt og lág bústaðabygging,* journal nr. 25/10630.
- *Umsókn um samanlegging millum matr. nr. 1038e, 1038f, 1038g, 1038h, 1038i og 1038k, Tórshavn,* journal nr. 25/10514.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

Viðmerking frá Teknisku deild:

Býarverkfrøðingurin ger vart við, at eigarin sjálvur skal gera atkomuveg við hartilhoyrandi veitingum til framtíðar íbúðarøkið í samráð við kommununa og eigaran av grannaognini matr. nr. 55-1000a. Umráðandi er at vendipláss er staðsett við endan á vegastrekkinum, og at neyðug p-pláss eru tøk til ferðsluna á økinum.

Eftir sum spurningurin um vegaatkomu til verandi vegaøkið við Eystan Heyg í løtuni ikki er viðgjørdur, skal vísast á, at mennarin skal kunna tola, at nýggi atkomuvegurin eina ferð seinni skal kunna knýtast í vegin Eystan Heyg og/ella Eiragarð, um politiskt ynski er um hetta.

Viðmerking frá Byggimálsdeildini:

Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um samanlegging av teimum somu seks matriklum til ummælis hjá Tórshavnar kommunu.

Teir seks matriklarnir hava í verandi løtu ikki beinleiðis vegatkomu. Grannamatriklarnir eru lagdir av til veg, men vegur er ikki gjørdur. Í løtuni er einans ein rás til fótgangandi ferðslu. Matriklarnir liggja longu uttan beinleiðis vegatkomu, og ein samanlegging broytir ikki hetta. Tí verður ikki mett, at samanleggingin eigur at sýtast av hesi orsøk.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☒**

**Skjøl**

- *Almenna byggisamtyktin – áðrenn broyting,* journal nr. 25/05584-13.
- *Almenna byggisamtyktin – eftir broyting,* journal nr. 25/05584-13.
- *Tekningar byggisamtykt,* journal nr. 25/05584-14.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri matr. nr. 1038k, 1038i, 1038h, 1038g, 1038f, 1038e og em verður broytt til A4 øki sambært kortskjalinum *Almenna byggisamtyktin – eftir broyting,* og beint í býráðið.

Tilmælið er treytað av, at mál um nýggjan umráðispart í almennu byggisamtyktini, A4, verður samtykt, sí mál 25/010630, *Nýggjur umráðispartur í almennu byggisamtyktini. A4 – tøtt og lág bústaðabygging.*

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. januar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri og trimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Lilja Blaasvær, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

# 15/26 Nýggjur umráðispartur í almennu byggisamtyktini. A4 – opin og lág bústaðabygging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.01.2026 | 24/26 | 25/10630-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 15/26 | 25/10630-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við yvirskipaða ynskið um at gagnnýta avmarkaða lendið í Tórshavnar kommunu á mest skynsama hátt, at býartætta og at gera tilgongdina at byggja íbúðir smidligari, verður mælt til at gera ein nýggjan umráðispart í almennu byggisamtyktini, ið verður lagdur til lága/opna bústaðarbygging.

**Lýsing av málinum**
Í málinum *Býarskipan 2025* verður mælt til, at býarmenning fyrst og fremst fer fram innan verandi býarmark, ístaðin fyri áhaldandi at víðka um býin niðan í fjøllini. Hetta fyri at tryggja eina skynsama lendisnýtslu og burðardygga býarmenning. Ein liður í at skipa býin á henda hátt er at byggja tættari í verandi byggilendi.

Í galdandi almennu byggisamtykt ber til at byggja íbúðir í bústaðarøkjum, um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið. Serstakar byggisamtyktir eru eitt hent amboð, tá talan er um at skipa økið neyvt, við støði í ítøkiliga økinum bygt verður í og ítøkiligu verkætlanini. Hetta kann tó vera ein longri tilgongd og kann taka upp í ár at koma á mál. Fyri at gera tilgongdina at byggja íbúðir smidligari, verður mælt til, at nýggjur umráðispartur verður lagdur í almennu byggisamtyktina, ið verður lagdur til lága/opna bústaðarbygging, har loyvi er at byggja sethús, tvíhús, raðhús og íbúðarbygging. Í hesum umráðisparti kann íbúðarbygging byggjast, sum kann skipast, uttan at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið, men einans krevur vanliga byggimálsviðgerð.

Í fyrsta umfari verða sjálvi økini ikki útløgd, men ásetingarnar og heimild verður givin almennu byggisamtyktini at útleggja tílík øki. Øki, ið verða mett at hóska til nýggja umráðispartin, eru størri samanhangandi óbygd øki, ið frammanundan liggja til bústaðabygging, men eru óbygd – t.d. óbygd A1 sethúsaøki. Tað ber illa til at siga, hvør minsta víddin á tílíkum samanhangandi umráðispørtum skal vera, av tí at tað kann vera ymiskt frá øki til øki, men tryggjast má, at víddin er ein ávís, soleiðis at tað ber til at gera eina skynsama skipan av umráðispartinum. Tað eigur t.d. ikki at bera til at útleggja tílíkar umráðispartar á einstøk óbygd sethúsagrundstykki í frammanundan skipaðum útstykkingum. Hetta eigur at verða lýst nærri í kommunuætlanini.

Av tí at hesin nýggi umráðisparturin hevur almennar ásetingar, og í stóran mun liggur millum siðbundin sethúsaøki, hevur tað týdning, at ásetingarnar í nýggja umráðispartinum ikki gera seg ov nógv inn á dámin í sethúsaøkjum. Tískil verður mælt til, at byggiregulerandi ásetingar, sum t.d. mest loyvda byggistig, nýtslustig og hæddir verða tær somu, sum í vanligum sethúsaøkjum. Harumframt verður áseting um mest loyvdu longd á framsíðum, soleiðis at íbúðirnar verða bygdar í eindum, ið hóska inn í sethúsaøkið. Munurin á hesum nýggja umráðispartinum og verandi sethúsaøkjum, t.d. A1 økjum, er, at tað ber til at skipa økið sum íbúðarøki, við t.d. felags parkeringsøki og hentleikum annars, umframt at til ber at sundurbýta íbúðirnar í eigaraíbúðir.

Sí uppskot til ásetingar fyri umráðispartin í skjalinum *Umráðispartur A4 í 3. grundumráði.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Umráðisparturin liggur í A øki í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini, sum er øki ætlað bústaðabygging.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Býarskipan 2025,* journal nr. 25/04377.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið er viðgjørt í samstarvi við Byggimálsdeildina, Teknisku deild og Umhvørvisdeildina.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
- *Umráðispartur A4 í 3. grundumráði,* journal nr.25/10630-4.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið um nýggjan umráðispart, A4 sambært skjali nr. 25/10630-4, í almennu byggisamtyktini og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. januar 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri og fýra atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Lilja Blaasvær og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

# 16/26 Ferðslumodel

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.01.2026 | 5/26 | 25/10812-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.01.2026 | 4/26 | 25/10812-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 16/26 | 25/10812-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við arbeiðið innan ferðslupolitikk er neyðugt at útvega umsitingini amboð til at meta um viðurskiftini av ferðslumynstrinum í kommununi.

**Lýsing av málinum**
Eitt ferðslumodel er ein lýsing av ferðsluviðurskiftum, har matematiskir frymlar útgreina sambandið millum ætlanir innan býarskipan og ferðsluviðurskifti øðrumegin og úrslitið av samlaðari ferðslumongd á vegakervinum hinumegin.

Modellið útroknar ferðslutrýstið út frá upplýsingum og fortreytum um vegakervið, býarskipan og fersðluteljingar (motoriseringsgrad bilar/1000 íbúgvar) og øðrum parametrum.

Serliga er tørvur á forsagnum ísv. avleiðingar í ferðslumynstrinum, sum standast av broytingum innan t.d. býarskipan og ferðslutillagingar.

Kommunan hevur fyri uml. 20 árum síðani nýtt ferðslumodell sum amboð í sambandi við broytingar av ferðsluviðurskiftunum í býnum og arbeiði innan planlegging av býarpørtum.

Fyri at ferðslumodellið kann gera neyvar útgreiningar, er neyðugt at útvega upplýsingar um m.a. samanseting av vegakervinum, fersðluteljingar á útvaldum vegastrekkjum, bygnað av býarpørtum samsvarandi byggisamtyktini, umframt íbúðar- og býarmynstur í kommununi.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
25/10812-2:
6-Ferðslumodel ~ 2005-1487_5 Beskrivelse af trafikmodel for Torshavn 283804_1_0.pdf

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| Býráðsfundur<br>29. januar 2026 | Blað nr.: 55<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 8175 | LK81999 | Vegir (íløgur) | 8175 | | | Ferðslumodell | 1.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 1.000.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 1.000.000 av kontu 8175 LK 81999 Vegir (íløgur) á nýggja verkætlan "Ferðslumodell" á kontu 8175, og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 12. januar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.
Ein minniluti, Kári Johansen og Birgir Nielsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot, um at arbeiðið verður bjóðað bert til føroyskar veitarar.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við átta atkvøðum fyri og fimm atkvøðum ímóti.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Lilja Blaasvær.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein

Atkvøtt varð síðani um upprunaliga tilmælið, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri og fýra atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Lilja Blaasvær og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

| | Býráðsfundur<br>29. januar 2026 | Blað nr.: 56<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 17/26 Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.01.2026 | 4/26 | 25/11095-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.01.2026 | 5/26 | 25/11095-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 17/26 | 25/11095-1 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. 25/04088 Innkomuvegur til bygdina og vegin niðan á Garðar og Soylugarðar í Kaldbak.

**Lýsing av málinum**
Ástaðarfundur varð hildin 03.12.2025.

Ynski frá umboðunum úr staðbundnu nevndini er, at farast skal víðari við arbeiðinum at tillaga uttanumøkið við Borgarahúsið.

Fyri at farast kann víðari í viðgerðini av málinum, skal fígging útvegast til arbeiðið, so tað kann bjóðast út.

**Skjøl**
mál nr. 25/04088 Innkomuvegur til bygdina og vegin niðan á Garðar og Soylugarðar í Kaldbak

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81062 | Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak | 8175 | L81062 | | Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak | 1.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla teknisku nevnd til at:
1) játta kr. 1.500.000 av løgukarmi LK81062, Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak, á nýggja verkætlan L81062, Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak, undir kontu 8175.
2) beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 12. januar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2026:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Einmælt samtykt.

## 18/26 Bussskýli í kommununi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.01.2026 | 2/26 | 25/10815-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 22/26 | 25/10815-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.01.2026 | 12/26 | 25/10815-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 18/26 | 25/10815-1 |

**Upprunin til málið**
Fyrispurningar er komnir frá borgarum í kommununi, um at seta fleiri bussskýlir upp runt í kommununi. Harumframt verður eisini spurt um staðseting av glasbussskýlum í økjum, har nógv ferðsla er.

**Lýsing av málinum**
Sum er, eigur kommunan eingi bussskýlir á goymslu. Vanliga ger rakstrarstovninum áleið 10 bussskýli hvørt ár. Helvtin av hesum verða sett upp sum nýggj. Hin helvtin verður brúkt, tá skýli skulu umvælast. Summi skýlir fara ofta illa í stormi, eru rotin og mugu tí skiftast út og til tíðir koyrast burtur.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Talið av busssteðgistøðum í allari kommununi er 188 og herav eru 125 bussskýlir.

Trupulleikin er, at eingin fígging er tøk til at gera hesi skýlir. Eingin beinleiðis rakstrarkontu er til bussskýlir. Um ætlanin er at broyta støðuna við bussskýlum er neyðugt at seta einar kr. 200-300 hundrað túsind hvørt ár.

Harumframt er neyðugt við játtan til útvegan av nýggjum bussskýlum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Sum ein liður í at fáa fleiri borgarar at brúka bussleiðina, skulu góðar umstøðurnar vera til staðar at bíða eftir bussinum, herundir eitt gott bussskýli.

Ætlanin er at fáa størri og betri glasbussskýlir sett upp á tey stóru plássini, har nógv fólk ferðast. Soleiðis at bíðitíðin gerst góð, meðan bíðað verður eftir bussinum. Ì framtíðini er talan um  at seta upp í alt tíggju glassskýlir upp, við staðseting, á Hálsi, Frælsið, Glasir, við NLH og við LSH. Umsitingin er í ferð við at kanna snið, tilfar og prís.

Rakstrardeildin fer framhaldandi at gera tey reyðu bussskýlini, sum verða framleidd í fýra sniðum/støddum. Stóru tørvurin er at fáa framleidd fleiri av teimum minstu og næstminstu busskýlunum. Við tað at eingi bussskýlir eru framleidd síðani 2024, er ætlanin at fáa framleitt 20 stykkir í 2026 og 20 stykkir í 2027, talan er um eina samlaða upphædd á í alt 1,2 mill kr.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☒**

**Skjøl**
-

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. januar 2026 | Blað nr.: 59<br>Forkvinnunnar merki: |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Fíggjað av rakstri.

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til at
1) játta kr. 600.000 í 2026, so at rakstrardeildin hjá kommununi kann framleiða reyðu bussskýlini.
2) heimila umsitingini at arbeiða víðari við loysnini við bussskýlum, bæði hvat viðvíkur sniði, tilfari og prísi at leggja fyri nevndina aftur.
3) Beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 12. januar 2026:** Útsett.

**Ískoyti**
Í framhaldi av viðgerðini av málinum um framleiðslu av reyðum bussskýlum verður skotið upp at gera nýggja verkætlan undir kontu 6275 Fríðkan av kommununi, við heitinum "Dagføring av bussskýlum" Arbeiðið verður boðið út til smærri timburmeistarar/byggifyritøkur við tekningunum og lýsingum við endamálinum at fáa gjøgnumskygni í kostnaðinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| 6275 | LK62048 | Torg í Hoyvík |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| 6275 | | | Dagføring av bussskýlum |

| Upphædd |
|---|
| 600.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 600.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**

Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til játta kr. 600.000 til nýggja verkætlan "Dagføring av bussskýlum" undir konto 6275, Fríðkan av kommununi, sum verða fluttar av verkætlan L62048 Torg í Hoyvík undir somu kontu.

**Ískoyti.**
Ískoyti:
Í teldubrævi dagf. 16.01.2026 til limir í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini er biðið um aftursvar í t-brævi upp á omanfyri standandi tilmæli frá tekniska stjóra, býararkitektinum og býarverkfrøðinginum.

Nágreiniliga er talan um træskýli, sum kommunan vanliga brúkar. Keypið fer í útboð og verður lagt fyri nevnd aftur til endaliga støðutakan, tá boð eru innkomin.

Nú svarfreistin er farin hava hesir limir tikið undir við tilmælinum.
Anja M. Hammer Weyhe, Heidi Lava Elgarsdótti, Birgir Nielsen, og Kári Johansen úr byggi- og býarskipanarnevdnini.

Harumframt hava Bergur Dam Jensen, Anja Weyhe, Heðin Mortensen og Annfinn Brekkstein úr teknisku nevnd tikið undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2026:** Einmælt samtykt og beint í býráðið.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Einmælt samtykt.

# 19/26 Samstarvsavtala millum Barnaverndartænastuna í Tórshavnar kommunu og Barnaverndartænastuna í Sandoyar og Skúvoyar kommunur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 27.11.2025 | 79/25 | 25/10356-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 15.01.2026 | 6/26 | 25/10356-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.01.2026 | 2/26 | 25/10356-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 19/26 | 25/10356-1 |

**Upprunin til málið**
Áheitan frá stýrinum fyri Barnaverndartænastuna í Sandoyar og Skúvoyar kommunu

**Lýsing av málinum**
Ynski er frá stýrinum fyri Barnaverndartænastuna í Sandoyar og Skúvoyar kommunur, at samstarvsavtala verður gjørd millum Barnaverndartænastuna í Tórshavnar kommunu og Barnaverndartænastuna í Sandoyar og Skúvoyar kommunur, soleiðis at barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunu verður niðurløgd og tey fáa ein lim í Barnanevndarnevndina í Tórshavn. Við hesum yvirtekur Tórshavnar kommuna alt virksemi í Sandoynni og Skúvoy, og hevur fulla ábyrgd av starvsfólkunum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Barnaverndarlógin (*Løgtingslóg um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 46 frá 27. mars 2025*).

Kommunustýrislógin (*Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023*)

Lóg um kommunal samstørv (*Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur*)

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fleiri upplýsingar koma seinni.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. januar 2026 | Blað nr.: 62 |
| | Forkvinnunnar merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla trivnaðarnevndini til, at heimila umsitingini at fara í samráðingar við stýrið fyri Barnaverndartænastuna í Sandoyar og Skúvoyar kommunur, um eina samstarvsavtalu millum Barnaverndartænastuna í Tórshavnar kommunu og Barnaverndartænastuna í Sandoyar og Skúvoyar kommunur.

**Trivnaðarnevndin 27. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Fundur hevur verið við Stýrið fyri barnaverndartænastuna fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur (*stytt: BVT Sandoy*) um hvussu eitt møguligt samstarv skal skipast millum eindirnar í framtíðini.

Gjørt er eitt uppskot til samstarvsavtalu um barnavernd millum TK og BVT Sandoy.

Viðmerkjast skal, at verandi lóggáva ikki heimilar eina fulla ella formella samanlegging av barnaverndarøkjunum.

Rættarliga grundarlagið loyvir einans samstarv millum sjálvstøðug samstarvsøki, og ikki sum ein samanlegging, har ábyrgd, heimildir og myndugleiki verða løgd saman í eina eind.

Av tí sama kann verandi skipan einans fremjast sum eitt samstarv, og ikki sum ein samanlegging.

Í verandi lóggávu er barnaverndarøkið í Føroyum ikki skipað sum eitt felags landsumfatandi kommunalt samstarvsøki. Økið er sambært galdandi lóggávu býtt upp í sjey sjálvstøðug samstarvsøki, sum hvør í sínum lagi hava ábyrgd og myndugleika innan sítt geografiska øki. BVT Sandoy er í hesum høpi eitt sjálvstøðugt og avmarkað samstarvsøki, og kann tí ikki uttan heimild í lóg leggjast saman við onnur øki.

Um tað er hent, at tit hava fingið eina aðra fatan av støðuni enn ta, sum rættarliga er galdandi, er hetta sjálvsagt óheppið.

Samstarvsavtalan skal tí skiljast og tulkast í samsvari við galdandi lóggávu og verandi skipan av barnaverndarøkinum.

Við hesi samstarvsavtaluni er talan í roynd og veru um eitt tænastukeyp, har BVT Sandoy keypir barnaverndartænastur frá Tórshavnar kommunu. Tórshavnar kommuna yvirtekur í hesum sambandi ta fakligu og umsitingarligu málsviðgerðina, meðan BVT Sandoy framhaldandi ber fíggjarligu ábyrgdina av málunum, sum hoyra undir teirra samstarvsøki.

Fíggjarliga verður hetta skipað við einum ávegisgjaldi, sum verður ásett út frá einum mettum miðalkostnaði. Avrokning fer síðani fram hálvárliga, har ávegisgjaldið verður reguleráð í samsvari við veruliga kostnaðin. Hetta skal tryggja eina rímiliga, gjøgnumskygda og haldføra fíggjarliga skipan fyri báðar partar.

**Skjøl:**

25/10356-7: "*Kunning um ætlaða samstarvsavtalu um barnaverndarmál millum Tórshavnar kommunu og Barnaverndartænastuna fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur - Mál hjá TK 25/10356*"

25/10356-8: "*Viðmerkingar frá Borgarstjóranum í Húsavíkar kommunu um uppskot til samstarvsavtalu um barnavernd millum TK og BVT Sandoy - Mál hjá TK 25/10356*"

25/10356-9: "*Svar til viðmerkingar til uppskot til samstarvsavtalu um barnavernd millum TK og BVT Sandoy - Mál hjá TK 25/10356*"

25/10356-11: "*Endaligt uppskot til samstarvsavtalu um barnavernd millum TK og BVT Sandoy*"

**Tilmæli:**

Kommunustjórin, trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á Sosiala deild mæla til, at:

1. Samtykkja uppskot til samstarvsavtalu millum Tórshavnar kommunu og barnaverndartænastuna fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur.
2. Tórshavnar kommuna fer í eitt samstarv um barnaverndarøkið við barnaverndartænastuna fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur.
3. Og beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 15. januar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Kári Johansen tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri og tveimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Lilja Blaasvær, Annfinn Brekkstein, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

# 20/26 Hvítanes og Sund sum valstað í Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.01.2026 | 9/26 | 26/00184-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 20/26 | 26/00184-1 |

**Upprunin til málið**
Umbøn frá Stjórn

**Lýsing av málinum**
Í Tórshavnar kommunu eru sjey valstøð. Størsta valstað er í Havn, og á løgtingsvalinum 8. desember 2022 vóru skrásettir 13.482 borgarar við valrætti.

Eftir stødd (tal á borgarum við atkvøðurætti) vóru hini valstøðini í kommununi til Løgtingsvalið 8. Desembur 2022 hesi:

| Valstað | Valrætt (8. Desember 2022) |
|---|---|
| Argir | 1.787 |
| Kollafjørður | 741 |
| Velbastaður | 240 |
| Nólsoy | 180 |
| Kaldbak | 176 |
| Hestur | 17 |

Eftir løgtingsvalið í 2022 varð Hoyvík góðkent sum sjálvstøðugur valstaður, meðan Hestur samstundis varð niðurlagdur sum valstaður.

Á Hvítanesi búgva 107 fólk og á Sundi býr 1.
Hesi atkvøða í dag á valstaðnum í Havn, sum er Ítróttarhøllin á Hálsi.

Hoyvík er skipað sum egið valstað, og høvdu hesir borgarar tá greitt atkvøðu har.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Løgtingið, sum seinast broytt við kunngerð nr. 102 frá 15. september 2023

**Upplýsingar frá umsitingini**
Heimildin at skipa Hvítanes og Sund sum valtstað í Hoyvík er § 20 í løgtingslóg um val til Løgtingið, ið er soljóðandi:

> *Atkvøðugreiðslan á hvørjum valstaði verður fyriskipað undir leiðslu av einum valstýri, sum sett er av kommunustýrinum. Hoyra bygdir úr ymsum kommunum til sama valstað, ger landsstýrismaðurin av, hvussu nógvar limir avvarðandi kommunur skulu velja. Stýrið hevur í minsta lagi 3 og hægst 5 limir og skipar seg sjálvt. Valstýrið førir gerðabók, sum kommunustýrið lóggildir.*
> *Stk. 2. Atkvøðugreiðsla fer fram í einum ella fleiri hølum, sum kommunustýrið ávísir, har atkvøðurúm í neyðugum tali eru sett upp. Atkvøðurúmini skulu vera soleiðis háttað, at ongin hevur møguleika fyri uttanífrá at síggja, hvussu avvarðandi hevur atkvøtt. Atkvøðurúmini skulu vera útgjørd við tí, sum er neyðugt fyri at atkvøða.*
> *Stk. 3. Kommunustýrið útvegar ein ella fleiri atkvøðukassar, ið skulu vera læstir, meðan atkvøðugreiðslan fer fram, og annars soleiðis háttaðir, at ongin atkvøðuseðil kann verða tikin upp úr, uttan kassin verður latin upp.*

*Stk. 4. Í atkvøðuhølunum skulu yvirlit yvir valevnislistarnar vera uppsligin. Somuleiðis skal vera uppsligin ein vegleiðing fyri veljararnar, sum skal innihalda tær greinir í hesi lóg, sum mest týdning hava fyri sjálvt valið.*

Ásett er í § 21 í løgtingslóg um val til Løgtingið, at tað er landsstýrismaðurin, sum við kunngerð broytir valstøðini:

***§ 21.*** *Val fer fram á teimum valstøðum, sum tilskilað eru á viðhefta skjali til hesa lóg. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð broyta valstøðini. Onki valstað kann hava færri enn 10 veljarar.*

At skift valstað krevur sostatt góðkenning frá landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum.

Mett verður ikki, at tað hevði kravt fleiri starvsfólk enn tey, sum í dag taka sær av valunum á valstaðnum í høllini Hoyvík.

Mett verður ei heldur, at hetta kemur at hava nakran eykakostnað við sær.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál 23/00223: " *Hoyvík sum valstað*"

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Kommunustjórin mælir býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at valstaðið Hoyvík eisini fevnir um bygdirnar Hvítanes og Sund, og heimila umsitingini at fáa til vega góðkenning frá landsstýrismanninum til at valstaðið Hoyvík eisini fevnir um Hvítanes og Sund.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2026:** Einmælt samtykt og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Einmælt samtykt.

## 21/26 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 38/25 | 25/00161-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 64/25 | 25/00161-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 58/25 | 25/00161-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 90/25 | 25/00161-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2025 | 85/25 | 25/00161-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 118/25 | 25/00161-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 98/25 | 25/00161-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 130/25 | 25/00161-1 |
| 9 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 175/25 | 25/00161-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 17.09.2025 | 166/25 | 25/00161-1 |
| 11 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 209/25 | 25/00161-1 |
| 12 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 236/25 | 25/00161-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 208/25 | 25/00161-1 |
| 14 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 260/25 | 25/00161-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 245/25 | 25/00161-1 |
| 16 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 303/25 | 25/00161-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 21.01.2026 | 14/26 | 25/00161-1 |
| 18 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 21/26 | 25/00161-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Framlagt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Fremlagt.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni og juli verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. september 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Mánaðarroknskapurin fyri august 2025 er um teldupost 18. september 2025 sendur fíggjarnevndarlimunum til góðkenningar.

Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen hava góðkent roknskapin.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**

Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri november verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Framlagt.

## 22/26 Umsókn um loyvi at at seta heitar pottar uttan fyri Sjósavnið, til økið verður eitt byggipláss í 2027

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.01.2026 | 21/26 | 25/06711-5 |
| 2 Tekniska nevnd | 12.01.2026 | 8/26 | 25/06711-5 |
| 3 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 22/26 | 25/06711-5 |

**Upprunin til málið**
Sjósavnið hevur sent kommununi umsókn um at seta heitar pottar uttanfyri Sjósavnið - í tíðarskeiðnum til økið verður eitt byggipláss í 2027.

**Lýsing av málinum**
Málið byrjaði við, at søkt var 24. juni 2025 um fyribilsloyvi at staðseta saunagos framman fyri Sjósavnið, har sum p-plássið er í dag. Eftir sum tað var feriutíð og svar ikki kom rættstundis, var rykt eftir svari. Í samskifti við umsøkjaran var víst á mál nr. 25/02597 Sauna/saunagos í Tórshavnar kommunu - 23/04346, har farið var undir nevndarviðgerð av málinum um staðsetingar ymsa staðni í kommununi. Fyribis loyvi var givið við teirri fatan, at talan var um staðseting av saunagosi í Álakeri. Hinvegin var fatanin hjá umsøkjaranum, at talan var um staðseting av saunagosi uttan fyri Sjósavnið.

Samskift hevur eftirfylgjandi verið við umsøkjaran um loysn av málinum. Umsøkjarin hevur víst á, at ætlanin er at taka saunagosið niður aftur á heysti í 2026 í sambandi við at farast skal undir verkætlanina at byggja eitt nýtt sjósavn í 2027.

Visandi til at talan er um eina misskiljing í samskiftinum millum umsøkjara og teknisku umsiting um staðsetingina av fyribils saunavirkseminum uttan fyri Sjósavnið, verður tað mett at vera óheppið at krevja eina niðurtøku beinan vegin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
25/06711-1 Umsókn at seta heitar pottar uttanfyri Sjósavnið - í tíðarskeiðnum til økið verður eitt byggipláss í 2027
25/02597-21 Kunning send út um alment útboð av verkætlanini

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at støða verður tikin til spurningin um, hvørt talan skal vera um royndarvirksemi, og hvussu langa tíð fyribils loyvið skal vera galdandi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. januar 2026:** Umrøtt.

Birgir Nielsen tekur ikki undir við royndarvirkseminum.

Kári biður um at fáa málið fyri býráðið.

**Tekniska nevnd 12. januar 2026:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Kári Johansen biður um at beina málið aftur í nevnd, ið bleiv samtykt við trettan atkvøðum fyri.

# 23/26 Umsókn um planering og byggiloyvi til at seta bingjur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.01.2026 | 5/26 | 25/08410-6 |
| 2 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 23/26 | 25/08410-6 |

**Upprunin til málið**
Eigarin søkir um fyribilsloyvi at planera eitt stykki á uml. 200 m² til at seta 3 bingjur á.

**Lýsing av málinum**
Eigarin av matr. nr. 185d í Kollafirði, sum liggur við endan av Jóan Paula gøtu, søkir um loyvi at planera eitt stykki á uml. 200 m² til at seta 3 bingjur á. Søkt verður um eitt tíðaravmarkað byggiloyvi á 3 ár. Ætlanin er at goyma amboð hjá einum byggivirki í bingjunum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðispartinum A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini. Kap. II, § 5, stk. 1 og 2, eru soljóðandi:

> “**1** Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
>
> Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
>
> **2** Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglunum hjá Tórshavnar kommunu.”

Brot úr *Flokking av virkjum í Tórshavnar kommunu*:

> “*Flokkur 2*
> Umfatar virkir, ið geva orsøk til minni ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi og kann staðsetast í øki, har tað eisini eru bústaðir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga minni virkir sum bókbindarar, elektronikk verkstøð og t.d. starvstovur. Frástøðan til bústaðir, er fyri henda flokk uml. 20 metur.”

**Upplýsingar frá umsitingini**
Talan er eitt óbygt øki sum er 5608 m² til víddar. Gjøgnum økið gongur ein gøta, sum bindur saman tveir býlingar. Ætlanin er at varðveita gøtuna, men at flyta núverandi portrið.

Málið hevur verið til partshoyring hjá tveimum grannum, grundað á at talan er um bústaðarøki og søkt verður um vinnuligt virksemi. Grannarnir hava ongar viðmerkingar til umsóknina.

Umsøkjarin hevur upplýst, at talan bert verður um goymslu av útgerð hjá felagnum so sum byggipallar (stillads), timbur og amboð v.m. Upplýst varð, at eingin kemur at arbeiða á staðnum, og at ferðslan til og frá økinum verður avmarkað.

Tí verður mett, at goymsla kann umfata virksemi, sum kemur í umhvørvisflokk 2 sambært reglunum hjá Tórshavnar kommunu, tí virksemið fer at hava minni ávirkan á nærmasta umhvørvi, sum umfatar 2 sethús.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. januar 2026 | Blað nr.: 74<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Málsnr. 25/05109 Fyrispurningur um kommunan er áhugað at keypa matr. nr. 185d í Kollafirði.
Kommunan er í samskifti við eigaran um at keypa ognina.

Málsnr. 25/01594 Umsókn um byggiloyvi til eina telthøll við Glasir á matr. nr. 1173a, Tórshavn
Í hesum máli hevur Føroya Landsstýrið fingið byggiloyvi til fyribils at hýsa eini telthøll við Glasir. Eindin verður nýtt til skúladepil til tekniska skúla, handilsskúlan, studentaskúlan og HF-skeið og onnur undirvísingarendamál. Loyvið er treytað av, at høllin ikki verður upphitað, og at høllin verður tikin niður innan 2 ár. Síðani er loyvið longt tvær ferðir.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Býarskipanardeildin metir ikki, at umsóknin at planera og seta bingjur á matr. nr. 185d í Kollafirði ávirkar eitt møguligt keyp av ognini.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
25/08410-1 Umsókn við mynd/tekning
25/08410-4 Viðmerkingar frá býarskipanardeildini

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | ja | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at geva eitt tíðaravmarkað byggiloyvi, sum serloyvi, treytað av at:

- Loyvið verður tíðaravmarkað í 3 ár; og tá loyvið rennur út, skulu bingjurnar verða burturbeindar av ognini.
- Bingjurnar verða staðsettar minst 20 m frá verandi grannahúsum.
- Bingjurnar ikki verða upphitaðar.
- Gøtan verður varðveitt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. januar 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum

Ein minniluti, Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum, men krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri og tveimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna

Winther Poulsen, Lilja Blaasvær, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

## 24/26 Umsókn um stuðul til at klæða húsini, Strúkijarnið, matr. nr. 170, Bakkahella 2, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 169/25 | 25/08434-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.01.2026 | 6/26 | 25/08434-2 |
| 3 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 24/26 | 25/08434-2 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av húsinum, Bakkahella 2, sokallaða Strúkijarnið, hevur fingið loyvi til at umvæla húsini, treytað av at umvælingin verður framd í fullum samsvari við tær treytir, ið byggivaldið og serstaka byggiráðið fyri Reyn setur, sum eru:

- at varðveita upprunadámin og betong úttrykkið á útveggjunum.
- at varðveita støddir og staðsetingar av vindeygum. Tó kann umsøkjari endurskapa gomlu blendaðu opini.
- at umbyggingin framvegis fevnir um tvær hæddir, har møguleiki er at grava út fyri kjallara, umframt at tekjan kann verða partvís hemsur og partvís terassa.

Áðrenn umvælingina var tað bert betongmúrurin, sum stóð eftir. Upprunaliga varð byggiloyvið givið til ein goymslubygning, men húsini eru seinni blivin brúkt til bústað. Rottangi var inni í húsinum, tá tað bleiv brúkt til bústað. Tá húsið hevur somu støðd sum matrikkulin, er einki uttanumøki til at seta rottanga á. Av teirri orsøk hevur kommunan givið loyvi til at seta rottangan á kommunalt øki framman fyri húsini. Tvs. at rottangin er staðsettur og niðurgrivin á p-plássi á Bryggjubakka.

**Lýsing av málinum**
Umvælingin er í gongd og húsið er við at verða liðugt umvælt, í tí sambandi søkir eigarin av strúkijarninum um stuðul frá kommununi til útreiðslurnar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Sethúsini liggja í 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

Viðvíkjandi trygging av endurnýggjanini stendur í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Reyn, at:
*Trygging av endurnýggjanini*
*1. Innan deildarøkini A1, A2, C1, C3 og D letur kommunan fyri hálvan prís máling, ið er góðkend av serstaka byggiráðnum.*
*2. Fyri deildarøkið A er galdandi*
*a. Í sambandi við privatar umvælingar av húsum uttan rindar kommunan og landsstýrið kostnaðarmunin ímillum tað, sum er neyðugt at gera og tað, sum serliga byggiráðið heldur vera ynskjandi.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Grundøkið, matr. nr. 170, Tórshavn, er 29 $m^2$ til víddar. Á ognini eru ábygd eini sethús á uml. 29 $m^2$ í tveimum hæddum.

Fyri at kunna rokna út stuðulsupphæddina má kommunan hava kvittanirnar fyri tilfarið, ið er brúkt uppá umvælingina, og hartil tilboð/vurdering uppá, hvat tað hevði kostað fyri somu umvæling, um tað varð sum til vanlig sethús.

Umvælingararbeiðið kostar kr. 187.213,53. Sum grundarlag undir stuðulsveitingini er tilboð nr. 164349 frá Bygma Balslev.

Umvælingararbeiði, ið er neyðugt at gera, kostar kr. 63.501,73. Sum grundarlag er tilboð nr 160178 frá Bygma Balslev.

Umvælingararbeiði sum serliga byggiráðið heldur vera ynskjandi: kr. 187.213,53.
Umvæling sum er neyðugt at gera: kr. 63.501,73.

*Kostnaðarmunurin ímillum tað, sum er neyðugt at gera og tað, sum serliga byggiráðið heldur vera ynskjandi: kr.* 187.213,53 - *kr.* 63.501,73 = *kr. 134.172,77*.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- jrn. 25/04291 Umsókn um stuðul til endur- og umbygging av Strúkijarninum, matr. nr. 170, Bakkahella 2, Tórshavn.
- jnr. 25/01912 - Umsókn um byggiloyvi til endur- og umbygging av Strúkijarninum, matr. nr. 170, Bakkahella 2, Tórshavn (upprunaliga: 22/00632)
- jnr. 25/00452 - Umsókn – Seta arbeiðsskúr upp við matr. nr. 170, Bakkahella 2, Tórshavn (upprunaliga: 24/09069)
- jnr. 25/00441 - Umsókn um seppitanga (rottanga) til Strúkijarnið, matr. nr. 170, Bakkahella 2, Tórshavn (upprunaliga: 24/09016).
- jnr. 17/03530 Umsókn um loyvi at hækka sethúsini á matr. nr. 170, 172 og 173, Tórshavnar kommuna (2003, bleiv noktað) (upprunaliga 2003-1846).
- jnr. 17/03400 Umsókn um byggiloyvi til smávegis broytingar á matr. nr. 170, 172, og 173, Tórshavn, (upprunaliga: 69/1942).
- Jnr. 17/03401 Umsókn um byggiloyvi til goymsluhús. Umsókn um at byggja omaná skúrið (bleiv játtað sum frávik) (upprunaliga J.nr. 77/1975).

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**
-

**Skjøl:** 25/08434-4, tilboð nr. 164349 og nr. 160178 frá Bygma Balslev.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei
Samlaða upphæddin er kr. 134.172,77 sum verður goldið av rakstrarkontu 6211 "Aðrar útreiðslur fríðkan".

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til, at stuðul verður veittur á **kr. 134.172,77** av konto 6211, Aðrar útreiðslur fríðkan, fyri gomlu Havnina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Útsett.

**Ískoyti:**

**Ein rætting er til útrokningina av stuðulsupphæddini. Ístaðin fyri upphæddina kr. 63.501,73 skal standa kr. 53.040,76, ið er tann rætta.**

Umvælingararbeiðið kostar kr. 187.213,53. Sum grundarlag undir stuðulsveitingini er tilboð nr. 164349 frá Bygma Balslev.

Umvælingararbeiði, ið er neyðugt at gera, kostar kr. ~~63.501,73~~ 53.040,76. Sum grundarlag er tilboð nr 160178 frá Bygma Balslev.

Umvælingararbeiði sum serliga byggiráðið heldur vera ynskjandi: kr. 187.213,53.
Umvæling sum er neyðugt at gera: kr. ~~63.501,73~~ 53.040,76.

*Kostnaðarmunurin ímillum tað, sum er neyðugt at gera og tað, sum serliga byggiráðið heldur vera ynskjandi: kr. 187.213,53 - kr. ~~63.501,73~~* 53.040,76 *= kr. 134.172,77*.

**Niðanfyristandandi er frágreiðing uppá stuðulsútrokningina sett í skema:**

| | Fakturar uppá tilfar til umvælingararbeiðið | Kostnaður | Frágreiðing |
|---|---|---|---|
| Umvælingararbeiði sum serliga byggiráðið heldur vera ynskjandi: | tilboð nr. 164349 frá Bygma Balslev. | kr. 187.213,53 | at varðveita upprunadámi n og betong úttrykkið á útveggjunum |
| Umvælingararbeiði, ið er neyðugt at gera: | tilboð nr. 160178 frá Bygma Balslev. | kr. - 63.501,73 | At klæða húsið sum vanligt er, so sum við impr. profilbrettum |
| Stuðul at veita: (munurin millum neyðugt at gera og tað sum er ynskjandi) | | **kr. 134.172,77** | |

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. januar 2026:** Ein meirluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum, men krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri og tveimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Lilja Blaasvær, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Tróndur luttók ikki í viðgerðini av málinum.

# 25/26 Umsókn um stuðul til umvæling av matr. nr. 142c, Reyngøta 16, 100 Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 167/25 | 25/09911-7 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.01.2026 | 7/26 | 25/09911-7 |
| 3 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 25/26 | 25/09911-7 |

**Upprunin til málið**
Í samband við umvælingararbeiði av húsinum, **Reyngøta 16, 100 Tórshavn, er umsókn um stuðul latin inn til kommununa.**

**Lýsing av málinum**
Eigarin av húsinum, Reyngøta 16, hevur fingið loyvi til at umvæla húsini, treytað av at umvælingin verður framd í fullum samsvari við tær treytir, ið byggivaldið og serstaka byggiráðið fyri Reyn setur, sum eru sambært, jnr. 24/02926 - Umsókn um byggiloyvi til umvæling av matr. nr. 142c, Reyngøta 16, 100 Tórshavn.

Umvælingararbeiðið umfatar bjálving og nýggja klæðing av øllum húsinum og hartil at skifta øll vindeygu og hurðar út við nýggjum. Tað er hetta umvælingararbeiði, ið eigarin av ognini søkir stuðul til.

Grundarlag undir stuðulsveitingini er: Faktura nr. 10213, 10214, 393507, 11, 449, 333546, 3513874, 3540837, 3554361, Fylgiskjal til Tilboð nr. 160141 og Tilboð nr. 160141 – vindeygu og klædningur frá Balslev.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Grundøkið, matr. nr. 142c, Tórshavn, er 123 $m^2$ til víddar. Á ognini eru ábygd eini sethús á uml. 65 $m^2$ í einari hædd og eitt úthús á uml. 9 $m^2$.

Sethúsini liggja í 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

Viðvíkjandi trygging av endurnýggjanini stendur í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Reyn, at:
*Trygging av endurnýggjanini*
*1. Innan deildarøkini A1, A2, C1, C3 og D letur kommunan fyri hálvan prís máling, ið er góðkend av serstaka byggiráðnum.*
*2. Fyri deildarøkið A er galdandi*
*a. Í sambandi við privatar umvælingar av húsum uttan rindar kommunan og landsstýrið kostnaðarmunin ímillum tað, sum er neyðugt at gera og tað, sum serliga byggiráðið heldur vera ynskjandi.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fyri at kunna rokna út stuðulsupphæddina má kommunan hava kvittanirnar fyri tilfarið, ið er brúkt uppá umvælingina, og hartil tilboð/vurdering uppá, hvat tað hevði kostað fyri somu umvæling, um tað varð sum til vanlig sethús.

Umvælingararbeiðið kostar kr. 275.416,49. Sum grundarlag undir stuðulsveitingini eru fakturarnir frá ymsum veitarum hjálagdir.
Umvælingararbeiði ið er neyðugt at gera kostar kr. 63.501,73. Sum grundarlag er tilboð uppá vindeygu og klædning v.m. frá Bygma Balslev.

Umvælingararbeiði, sum serliga byggiráðið heldur vera ynskjandi: kr. 275.416,49.
Umvæling sum er neyðugt at gera: kr. 63.501,73.

*Kostnaðarmunurin ímillum tað, sum er neyðugt at gera og tað, sum serliga byggiráðið heldur vera ynskjandi: kr. 275.416,49- kr. 63.501,73 = kr. 211.914,76.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
24/02926 Umsókn um byggiloyvi til umvæling av matr. nr. 142c, Reyngøta 16, 100 Tórshavn.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**
-

**Skjøl**
25/09911-10 Skjøl til sagsfremstilling

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

Samlaða upphæddin er kr. 211.914,76, sum verður goldið av rakstrarkontu 6211 "Aðrar útreiðslur fríðkan".

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til, at stuðul verður veittur á **kr. 211.914,76** av konto 6211, aðrar útreiðslur fríðkan, fyri gomlu Havnina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. januar 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi Lava Elgeirsdótti, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum, men krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Atkvøtt bleiv um tilmælið, ið bleiv samtykt við níggju atkvøðum fyri og trimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Kári Johansen, Annfinn Brekkstein og Lilja Blaasvær.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 21:00</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heidi Lava Elgeirsdóttir | Annita á Fríðriksmørk |
| Anja Weyhe | Kristianna Winther Poulsen | Bergur Robert Dam Jensen |
| Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson | Kári Johansen |
| Høgni Vilhelmsen | Birgir Nielsen | Elin Heðinsdóttir Joensen |
| | Lilja Haraldson Blaasvær | |